# AÐALFUNDUR HJÁ KOMMUNUFELAGNUM

# 2024

Kommunufelagið



Útgevari: Kommunufelagið
Uppseting: Nudlavirkið
Myndir: Ólavur Frederiksen og Kommunufelagið
Prent: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit

1. Vælkomin . . . 4
2. Viðtøkubroytingar og uppskot til nýggjar viðtøkur . . . 6
3. Vælferðarøkini . . . 8
Barnaøkið . . . 8
Eldraøkið . . . 9
Heilsuøkið . . . 11
Bústaðarøkið . . . 11
4. Arbeiðsmarknaðurin . . . 12
5. Skúli og mentan . . . 14
6. Umhvørvi og ferðavinna . . . 18
7. Elorkuøkið . . . 20
8. Annað virksemi í húsinum . . . 22
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið . . . 22
Barnaverndarstova Føroya . . . 24
SSP-ráðgevingin . . . 26
Listaleypurin . . . 26
Talgilda HeilsuSkipanin . . . 28
9. At enda . . . 30
10. Kommunubúskapurin 2023 . . . 31
Gongdin í fólkatalinum . . . 31
Kommunubúskapurin . . . 33
Kommunurnar fáa nú part av tøkugjaldinum og veiðigjøldunum . . . 36
Broytt skuldarmark . . . 36
11. Kommuna og kommunuhugtakið . . . 44
12. Um Kommunufelagið . . . 46
Viðtøkur fyri Kommunufelagið . . . 48
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið . . . 50
Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya . . . 52



# 1. Vælkomin

”Tað er sum at fáa navaran niður ígjøgnum eina harða fjøl.” Soleiðis tók Max Weber einaferð til, tá ið hann umrøddi politisk viðurskifti, og Heini í Kunoy tók ofta til av tingsins røðarapalli, at tað at fáast við politikk, var sum at arbeiða í einum grótbroti, mann verður ongantíð liðugur. Aeternum opus. Orsøkin er, at kringumstøðurnar broytast javnt og samt, og táið eitt mál er rokkið, miðar tú eftir tí næsta. Politikkur er sum ein kringekja, ið ongantíð svevur. Ongin fær heldur steðgað henni á leiðini fram.

Háttvirda samkoma. Hjartaliga vælkomin til aðalfund hjá Kommunufelagnum, sum er hin ellinti í røðini, síðan allar kommunurnar í landinum gjørdust partar av einum og sama felag í 2014.

Ein kona spurdi meg nú ein dagin, um Kommunufelagið bert var ein verjusamgonga, sum ongar visiónir og ætlanir hevur? Svarið var, at vit rúma báðum. 29 kommunur hava hvør sær sína egnu visión, og samtakið – Kommunufelagið – skal andvegis øðrum myndugleikum tryggja, at tað ikki verður søkt at møguleikanum at fremja verk samsvarandi visiónunum kring um landið. Kommunurnar eru framsøkni bulurin undir føroyska samfelagnum á flestu mótum, og Kommunufelagið kann kallast ein verjusamgonga, táið tað snýr seg um at verja okkara politiska frælsi ímóti álopum uttaneftir.

Kommunuval verður 12. november í ár, og harvið er hetta seinasti aðalfundur felagsins í hesum valskeiðnum. Vit báðir Heðin hava sitið í formansskapinum hetta skeiðið og lupu um borg á hálvari leið. Honum takki eg fyri sera gott samstarv, og fari eg eisini at nýta høvi at takka KAF-formanninum og ikki minst fyrisiting okkara við Eyðuni Christiansen, leiðtogara, á odda, fyri væla verk og hendinga gott samstarv.

Kommunufelagið fylti 10 ár fyri kortum. Á aðalfundinum í 2023 varð kunngjørt, at hetta tíðarmál setti undir, at ein eftirmeting var gjørd av viðtøkum felagsins, sum av góðum grundum vóru ávirkaðar av samanleggingini millum Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag við virknaði frá 1. januar 2014.

Yvirskipaði bjálkin í arbeiðinum hevur verið at demokratisera felagið. Hesi árini hava tað t.d. bert verið 13 borgarstjórar – av 29 – sum hava havt møguleika fyri at møta á stýrisfundum. Tað er nú broytt, og vónandi fáa aðrar viðtøkubroytingar neyðugu undirtøkuna á aðalfundinum soleiðis, at felagið stendur á einum tryggum palli tey næstu nógvu árini. Onki er meiri eyðsýnt enn tað, at tørvurin á einum magnmiklum kommunufelag bara fer at økjast við tíðini. Í eftirmetingarbólkinum hava sitið Heðin Mortensen, Per Martin Gregersen, Eyðun Christiansen, Janus Haraldsen og eg sjálvur.

Í samfelagshierarkinum standa kommunurnar undir lóggevandi valdinum, sum velur útinnandi valdið. Bulurin er kommunustýrislógin, men kommunurnar skulu í gerandisdegnum eisini fyrihalda seg til alt fleiri lógir, nú so nógv høpi eru løgd út til teirra at reka. Í so máta má felagið støðugt vera á varðhaldi soleiðis, at vit ikki vera tikin á búri, tá lógir verða broyttar.

Av góðum grundum er nógv samskifti millum Føroya Landsstýri og Kommunufelagið. Hóast ósamd um staklutir, so hevur tað sjáldan, fyri ikki at siga ongantíð, verið betri dialogur millum partarnar enn undir sitandi landsstýrissamgongu. Partarnir vita av hvørjum øðrum og tosa við hvønn annan, táið tað verður hildið neyðugt. Fleiri av politisku lyftunum hjá samgonguni ávirkaðu av góðum grundum fíggjarstøðuna hjá kommununum, men tað hevur higartil í flestu førum eydnast okkum at fáa javnað missin aftur, táið átøkini vóru sett í verk. Lønarlyft, tøkugjøld, veiðigjøld eru dømi um tað.

Í næstum kann væntast, at málið um 37 tíma arbeiðsviku kemur fyri aftur, og líkamikið hvat ið mann meinar um málið, kemur tað at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Búskapardeildin hjá Kommunufelagnum hevur roknað seg fram til, at samlaða langtíðarávirkanin, um málið verður framt, verður 613 milliónir krónur í dagsfæi, og av hesum eiga kommunurnar 205 milliónir krónur. Eisini í hesum málinum er felagið búgvið til at verja tey kommunalu áhugamálini.

Tað er ikki ov nógv sagt, nú so nógv er lagt út til kommunurnar at reka, at hesar eru tann veruligi stabilisatorurin hjá borgarunum í Føroyum. Fólkið kennir seg væl nærri hinum kommunala- heldur enn landsgeiranum. Stytttri er millum partarnar, og tað skjótari kunnu avbjóðingar takast upp til viðgerðar og loysast øllum til frama. Um somu tíð sum kommunurnar hvør í sær hava eina framtíðarsjón um sítt egna lív, skal Kommunufelagið støðugt standa sum garanturin fyri, at onnur ikki leggja okkum fótonglar í vegin.

Kommunufelagið luttekur millum onnur áhugamál í einum orkubólki, sum landsstýrið hevur sett, og fyrstu úrslitini síggjast nú aftur í broytingaruppskoti til elveitingarlógina, sum liggur í tinginum. Bólkurin heldur fram, til komið er á mál. 5-mannabólkurin, sum í sínari tíð varð valdur til tess at viðgera SEV-bygnaðin, hevur verið ov lítið virkin, men hann fer eftir aðalfundin at seta ferð á arbeiðið aftur.

Tað kemur fyri, at enntá onkur samfelagsfrøðingur heldur, at kommunurnar áttu at verið foyktar endaliga av jørðini. Fái ikki verið meiri ósamdur. Umframt at tryggja neyðugu undirstøðuna í gerandislívinum hjá føroyingum, verða dagstovnar, eldrarøkt, skúlar, karmar um frítíðarlívið hjá fólki o.s.fr. skipað í kommunalum regi, og ikki minst er tað ein kommunalur leikur, at ravmagn støðugt kemur út í kontaktirnar á bróstunum hjá okkum øllum fyri sama kostnað, og at ruskposarnir verða heintaðir hvørja viku.

Støðan í heiminum er verri, enn hon hevur verið. Vápnasmiðirnir hava aftur góðar dagar, og so hvørt sum blóðið flýtur í Ukraina, Gaza, Yemen og aðrar staðir, skroyvar tað upp í teirra trivaligu peningaboksum. Sjálvandi ávirkar hetta eisini eitt fjarskotið land sum Føroyar, men higartil sær tað ikki út til at hava havt stórvegis ávirkan á føroyska búskapin. Okkara fyrimunur er sjálvandi, at vit í stóran mun eru mateksportørar, og tørvurin á mati bara veksur, so hvørt sum mannættin bara fjølgast. Yvirhøvur sær fíggjarliga gongdin hjá kommununum higartil í ár út til at vera á heilt góðari leið. Rentan er m.a. fallandi aftur eftir eitt lop øvuta vegin, og har sum nakað av skuld er, er tað ein skjót og góð hjálp í rakstrinum.

Felag okkara er sett í verðina til tað at verja staðbundna fólkaræðið. Hetta krevur dyggar stavnabúgvar, og teir veit eg, at kommunurnar eiga. Tað var mær ein sera stórur heiður at verða valdur formaður í felagnum fyri góðum ári síðan, og táið hetta er seinasti aðalfundurin í hesum valskeiðnum, fari eg hjartaliga at takka øllum, sum eg havi samvirkað við hesa tíðina. Hóast mangan strævið, hevur tað givið góðan íblástur í gerandisdegnum – vónandi til frama fyri Kommunufelagið líka.

Trýst er á fólkaræðisligu hugsanini um allan heim í dag, tað størri er okkara lutur at verja tað siviliseraða samfelagið við tríbýtta valdinum. Ella sum politiski giganturin Winston Churchill tók til: "Fólkaræði er burturúr hitt ússaligasta amboðið at stjórna einum samfelag uppá, altso, táið man sær burtur frá øllum øðrum amboðum, sum eru okkum tøk.” Øll alternativini eru verri enn demokratiið, sum eisini vit í Kommunufelagnum hava skyldu til at verja, líkamikið hvussu víkir og vendir.

Enn einaferð ein serlig tøkk til tykkum í fyrisiting felagsins, sum hava verið okkum í formansskapinum so væl til hjálpar síðan ársskiftið 2020/21.

Tórbjørn Jacobsen, formaður í Kommunufelagnum



# 2. Viðtøkubroytingar og uppskot til nýggjar viðtøkur

Fyri jól fór stýrið í Kommunufelagnum frá at vera eitt forum fyri 13 borgarstjórar, til at allir borgarstjórar nú hittast á regluligum fundum í felagnum. Hetta samtykti eykaaðalfundurin hjá Kommunufelagnum hin 15. desember 2023.

Á eykaaðalfundinum vóru í uppskoti broytingar í viðtøkum, sum skuldu fáa gildi 1. januar 2024 og eitt annað uppskot til nýggjar viðtøkur fyri felagið, sum skuldu fáa gildi eftir komandi kommunustýrisval ella 1. januar 2025.

Viðtøkubroytingar hava til endamáls at knýta tær kommunur, sum í dag eru uttanfyri stýrið í felagnum, nærri at felagnum. Uppskotið varð tí orðað soleiðis, at borgarstjórar uttanfyri stýrið framyvir skulu hava rætt at møta og taka orðið á øllum stýrisfundum. Hetta skal fyrst og fremst styrkja um møguleikarnar hjá øllum kommunum at gera sína ávirkan galdandi í felagnum og geva teimum eina meiri beinleiðis ávirkan á, hvat felagið skal arbeiða við.

Semja var um broytingaruppskotið, sum tískil varð einmælt samtykt. Full semja var somuleiðis um fram ímóti ársaðalfundinum at arbeiða víðari við teimum nýggju viðtøkunum, sum skuldu koma í gildi 1. januar 2025.

Síðan eykaaðalfundin hevur ein arbeiðsbólkur arbeitt víðari við nýggju viðtøkunum. Eitt tillagað uppskot varð lagt fyri borgarstjórafund í februar 2024, og breið undirtøka var fyri høvuðstáttunum í uppskotinum. Semja var tí um at senda eitt ítøkiligt uppskot út til kommunurnar til møguligar viðmerkingar, og at uppskotið til nýggjar viðtøkur síðani skuldi leggjast fyri aðalfundin 19. apríl 2024 – gott 10 ár eftir at felagið varð stovnað.



Nýggju viðtøkurnar, sum eru í uppskoti, innihalda eina røð av smærri broytingum, dagføringum, nágreiningum og málsligum tillagingum. Harumframt innihalda nýggju viðtøkurnar størri broytingar, sum eru eitt úrslit av politiska ynskinum um eina aðra skipan av felagnum og at knýta allar kommunurnar tættari at felagnum:

- Stýrið við 13 økisvaldum limum verður niðurlagt og umskipað til ein borgarstjórafund, har allar kommunur eru umboðaðar.
- Ein formansskapur verður formliga skipaður við fimm borgarstjórum.
- Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) verður knýtt tættari at felagnum og gerst ein starvsnevnd undir Kommunufelagnum – við egnari nevnd og starvsskipan. SEV og IRF varðveita við sínum formonnum umboð í starvsnevndini í KAF, og tryggjað verður á tann hátt, at talan verður um eina starvsnevnd við fólkavaldum umboðum.
- Nýggj politisk starvsnevnd verður skipað fyri barnaverndarøkið – somuleiðis við egnari nevnd og starvsskipan.
- Eitt samstarvsráð verður skipað fyri forfólkini í KF, KAF og BVS.

Øll politisku umboðini verða – undantikin SEV og IRF – vald á borgarstjórafundinum.

Borgarstjórafundurin velur sostatt allan formansskapin, tríggjar av limunum í KAF og allar tríggjar limirnar í BVS. Aðalfundurin verður tó framvegis hægsta vald í felagnum, og í øllum týðandi lutum er hetta varðveitt í uppskotinum til nýggjar viðtøkur.

Verða nýggju viðtøkurnar samtyktar, fáa tær ætlandi gildi, tá ið nýggju kommunustýrini taka við.

### Hendingar í árinum

## Ansingartrygd ikki eitt hugtak í Føroyum

Ein kommunustýrislimur vendi sær til skrivstovuna við fyrispurningi um ansingartrygd á dagstovnaøkinum (da. pasningsgaranti). Í kommununi hevði støðan verið tann, at tað hevði verið gjørligt at veita dagstovnapláss at kalla frá degi til dags. Men nú var farið at sansa at, og trupult var at halda hetta tænastustøðið. Við støði í hesum varð spurt, um ein kommuna kundi áseta sítt egna tíðarskeið á ansingartrygd, og um nøkur lóg var um ansingartrygd. Ítøkiliga var hugsanin, at dagstovnaleiðslan kundi fáa heimild at áseta eina bíðitíð upp á tveir mánaðir.

Skrivstovan upplýsti, at kommunan fyrst av øllum mátti halda seg til egnar upptøkureglur.

Víst varð á, at kommunan eftir dagstovnalógini (§ 4, stk. 2) skal gera slíkar reglur fyri dagstovnar og/ella dagrøktir í kommununi, og at reglurnar skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum. Kunnað varð um, at sambært viðmerkingunum til lógina ber millum annað til at gera ásetingar um bíðilistar, og hvussu hesir skulu umsitast.

Burturúr hesum metti skrivstovan, at tað má metast sum lógligt at hava bíðilista til kommunala tilboðið – altso at tað ikki er eitt rættarkrav at fáa pláss á dagstovninum, júst tá ið foreldrini ynskja tað.

Skrivstovan kunnaði um, at "ansingartrygd" er ikki lógarásett í Føroyum, tó at hugtakið í ymsum høpi hevði verið umrøtt bæði lands- og kommunalpolitiskt.

Av tí sama hevur hugtakið ikki nakað fast og alment viðurkent innihald í Føroyum. Velur ein kommuna at nýta hugtakið "ansingartrygd" í upptøkureglum sínum, má tað tískil lýsast nærri, hvat meinast við. Í hesum sambandi hevði ikki verið rætt at nýtt hugtakið, um ongin verulig trygd er í sonevndu "ansingartrygdini", t.d. ein trygd um at barnið eftir ávíst tíðarskeið fær rætt til dagrøktartilboð, inntil pláss er á dagstovninum.

Er ætlanin hinvegin ikki at veita eina veruliga trygd, men heldur at seta eitt mál fyri kommunala tænastustøðið, so eiga onnur hugtøk at verða brúkt – hugtøk sum ikki geva borgarum eina fatan av, at talan er um eitt lyfti frá kommununi.

Víst varð at enda á, at gevur kommunan lyfti um ávíst tilboð, so kann endurgjaldsábyrgd eftir umstøðunum koma upp á tal, um kommunan ikki megnar at halda lyfti sítt.



# 3. Vælferðarøkini

Ábyrgdin av alsamt fleiri stórum og týðandi vælferðarøkjum eru løgd kommununum seinnu árini. Dagstovnaøkið í 2001, barnaverndarøkið í 2005, og í 2015 var seinasta stóra málsøkið, eldraøkið, lagt kommununum. Hetta er ein ásannan av, at borgaratænastur sum heild liggja betri hjá kommununum. Nærleikin millum politikara og borgara tryggjar betri tænastu, betri og smidligari umsiting og betri møguleikar fyri virknari borgaraluttøku og harvið størri ávirkan hjá tí einstaka á tænasturnar, sum verða veittar í nærsamfelagnum. Men avbjóðingarnar á vælferðarøkinum eru stórar, serliga orsakað av demografisku broytingunum, sum eru fyri framman. Vit gerast alsamt fleiri eldri, samstundis sum vit eiga færri børn. Komandi 10 árini fer talið av eldri fólki yvir 80 ár væntandi at vaksa við 1.200 fólkum ella áleið 50 %. Starvsfólkatrotið á vælferðarøkinum er longu nú ein avbjóðing, og starvsfólkatrotið fer sannlíkt at økjast. Samstundis vóru bara født knapt 600 børn í Føroyum í 2023, sum er søguliga lágt.

Skulu framtíðar ættarlið liva í einum framkomnum vælferðarsamfelagi, er neyðugt at vit bygnaðarliga skipa okkara vælferðartænastur skynsamt, og hetta fer uttan iva at krevja bygnaðarbroytingar í føroyska samfelagnum. Broytingar, sum sannlíkt ikki altíð verða so einfaldar at semjast um. Men land og kommunur mugu finna felags stev í fyrireikingunum til tær bygnaðarbroytingarnar, sum eru neyðugar í samfelagnum.

Henda samgongan tók stig til at samskipa alt barnaøkið við at skipa eitt nýtt aðalráð fyri barna- og útbúgvingarøkið. Eitt aðalráð, sum skal hava yvirskipaðu ábyrgdina av at samskipa tænastur til børn og ung og minka um vandan fyri, at børn og ung detta niður ímillum skipanir.

Eitt tað fyrsta sum ráðið tók stig til var, við íblástri úr Íslandi, at skipað sokallaðu barnaverkætlanina.

## Barnaøkið

### BARNAVERKÆTLANIN VÆL Í GONGD

28. mars 2023 skrivaðu landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, landsstýrisfólkini í almanna- og mentamálum, heilsumálum og løgmálum, saman við formansskapinum í Kommunufelagnum undir eitt semjuskjal um at virka í felag fyri at finna loysnir, sum kunnu sameina tænastur, sum verða veittar børnum og ungum.

Partarnir vóru samdir um

- at virka í felag fyri at finna loysnir, sum kunnu sameina tænastur og veitingar, sum verða veittar børnum og ungum, til tess at tey kunnu hava viðburð og trivnað.
- at økt samstarv er neyðugt fyri at tryggja, at børn og ung kunnu verða sett fremst í tænastuveitingunum, og fyri at vit hava eitt barnavinarligt samfelag.

Visiónin er, at Føroyar skulu verða tað besta staðið í heiminum hjá øllum børnum og ungum at vaksa upp í. Øll børn og ung skulu hava tryggar og góðar karmar, sum tey kunnu mennast og mentast í. Ein skilagóður bygnaður skal tryggja sameining og samskipan av tænastum, sum ymiskir geirar og stovnar veita, soleiðis at hesir samvirka til at veita eina so góða tænastu sum møguligt.

Verkætlanin tekur støði í ásannanini av, at vælferðin hjá børnum og ungum er avgerandi fyri eitt sunt og burðardygt samfelag, børnini er okkara týdningarmesta felags tilfeingi og sjálv framtíðin hjá okkara samfelagi.

Arbeiðið er skipað sum ein verkætlan undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Hetta seinasta árið hevur verið arbeitt við at kortleggja verandi vitan um lívskorini hjá børnum og ungum. Millum annað var skipað fyri stórari vitanarráðstevnu í Norðurlandahúsinum, har fleiri enn 250 fólk, sum arbeiða við børnum og ungum umboðandi allar viðkomandi geirar, stovnar og felagsskapir, vóru savnað.

Kortleggingararbeiðið heldur fram í 2024, og nú eru ein verkætlanarleiðari og ein samskipari settir til at stýra verkætlanini.

Byrjað verður við at gera yvirlit yvir lóggávuna og verandi ábyrgdarbýti á økinum og tilmæli um møguligar lógbroytingar, sum við fyrimuni kunnu verða gjørdar. Eisini skulu neyðugar kanningar gerast av liviumstøðunum hjá børnum og ungum í Føroyum. Hesar kanningar verða eftir ætlan gjørdar í samstarvi við Setrið.

Fyrsta ítøkiliga verkætlanin, sum er viðkomandi fyri kommunurnar, er longu í gongd. Talan er um endurskoðan av tilboðnum um familjudepil, eitt stovnstilboð, sum hevur verið ábyrgd hjá landinum, men sum nú í meira enn tvey ár hevur verið óvirkið, hóast játtan á løgtingsfíggjarlógini.

Arbeiðsbólkur er settur við avvarandi pørtum at koma við tilmæli um, hvussu stovnstilboðið skal virka framyvir, og um broytingar skulu gerast í ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur á økinum. Bólkurin skal koma við sínum tilmæli í seinasta lagi flaggdagin 25. apríl. Fleiri slíkar smærri verkætlanir verða væntandi skipaðar komandi árið.

### EFTIRMETING AV TÍ GÓÐU TILGONGDINI

Borgarar, sum bera brek, hava ofta tørv á tænastum frá fleiri ymiskum stovnum og myndugleikum. Tað hevur víst seg, at borgarin og avvarðandi uppliva manglandi samskipan millum tænastur, og tað hevur stóra ávirkan á gerandisdagin hjá nógvum familjum. Í 2012 var farið undir verkætlan við tí endamáli at skipa samanhangandi tænastu tvørtur um fakligar geirar, har úrslitið gjørdist tilmælið, “Tann góða tilgongdin”. Í samgonguskjalinum er ásett, at skipanin við Tí góðu tilgongdini skuldi eftirmetast og víðkast.

Síðan miðskeiðis í 2022 hevur Kommunufelagið verið partur av einum arbeiði at eftirmeta Ta góðu tilgongdina fyri børn við autismu og familjur teirra. Arbeiðið bar við nógv viðurskifti og hevði eina røð av áhugapørtum. Saman við praktiskum viðurskiftum – herundir einum longri steðgi orsakað av løgtingsvalinum – dró nakað út at fáa hetta arbeiðið liðugt, men tíðliga í vár bar á mál.

Fyrst í mars 2024 handaði arbeiðsbólkurin Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, eftirmeting av Tí góðu tilgongdini. Samanumtikið staðfesti eftirmetingin, at Tann góða tilgongdin er góð hjálp hjá familjum við børnum, ið hava autismu, tá ið tilgongdin virkar eftir ætlan. Til samans fevnir eftirmetingin um 17 tilmæli, harav nøkur kunnu setast í verk skjótt, onnur krevja politiska støðutakan, meðan uppaftur onnur mugu viðgerast nærri.

## Eldraøkið

### TØRVUR ER Á AT ENDURSKOÐA FÍGGINGINA AV ELDRAØKINUM

Útleggingin av eldraøkinum til kommunurnar frá 1. januar 2015 er ivaleyst størsta kollvelting av kommunala geiranum í nýggjari tíð. Stórur partur av framtíðar haldførisavbjóðingini vegna vaksandi talið av eldri borgarum, var nú flutt frá landinum til kommunurnar. Hetta broytti fullkomiliga fíggjarligu fyritreytirnar hjá kommununum. Frá at hava havt ein haldføran búskap, sum hvíldi í sær sjálvum, standa kommunurnar nú brádliga við einari stórari fíggjarligari avbjóðing. Einari avbjóðing, sum tær ikki sjálvar hava amboð til at loysa á nøktandi hátt.

Avgjørt var tá, at ein eftirmeting skuldi gerast eftir 5 árum. Eftirmetingin var liðug í desember 2021, tá ein arbeiðsbólkur handaði táverandi landsstýri og stýrinum í Kommunufelagnum eina frágreiðing við ítøkiligum tilmælum um, hvussu inntøkugrundarlagið hjá kommununum kundi styrkjast fyri at standa ímóti framtíðar útreiðsluvøkstrinum. Eftirmetingin vísti greitt, at fíggingarleisturin higartil hevði verið nøktandi, men at hann als ikki kundi fíggja útreiðsluvøksturin frameftir. Eftirmetingin fekk skjóta viðgerð í Kommunufelagnum, og felagið setti seg beinanvegin í samband við táverandi landsstýri um málið, men onki kom burturúr.

Núverandi landsstýri hevur longu fingið fleiri viðurskifti upp á pláss. Kommunala skuldarmarkið er nú broytt soleiðis, at eftirlønarskattur og afturbering telja við í inntøkugrundarlagnum, tá ið skuldarmarkið verður ásett. Eisini hava kommunurnar umsíðir fingið heimild at dagføra gjøldini fyri búpláss, umlætting og heimahjálp, eftir at tey hava staðið í stað í næstan 10 ár.




Men greitt er, at skuldarmark og brúkaragjøld kunnu ikki fíggja framtíðar tørvin á eldrarøkt. Har mugu munandi størri broytingar til. Her hava kommunurnar serliga víst á trý tiltøk, sum samanlagt veruliga kunnu gera mun. Fyrsta tiltakið er, at botnfrádrátturin í kommunuskattinum verður niðurlaðaður yvir eitt longri áramál. Annað tiltakið er, at rentustuðulin verður niðurlaðaður komandi árini, og tað triðja er, at kommunurnar sleppa undan at rinda meirvirðisgjald til landið. Hesi trý tiltøk kunnu samanlagt styrkja kommunala búskapin so nógv, at hann klárar at standa ímóti framtíðar útreiðsluvøkstrinum.

Verða ongar broytingar gjørdar, eru einastu amboð hjá kommunum at hækka skattaprosentið og lækka barnafrádráttin. Havandi í huga, at inntøkugrundarlagið er so ymiskt millum kommunurnar, fer tað hava við sær einar Føroyar, sum fara fullkomiliga út av javnvág. Vit fara at fáa ein vaksandi fíggjarligan ójavna millum útjaðaran og miðstaðarøkið, tí greitt er, at skattaprosentini mugu hækka fleiri ferðir so nógv í útjaðaranum sum í miðstaðarøkinum. At lata standa til er tí ikki nøkur góð loysn, tí hví skal ein skattgjaldari í útjaðaranum rinda fleiri túsund krónur meira í skatti til eldrarøkt enn ein skattgjaldari í miðstaðarøkinum?

### ANSINGARSAMSÝNINGIN VERÐUR UMSÍÐIR DAGFØRD OG ENDURSKOÐAÐ

Í staðin fyri at veita heimahjálp ber til at lata ein avvarðandi ansa teimum gomlu. Tey, ið átaka sær uppgávuna, eru oftast børn ella hjúnafelagi hjá tí gamla. Fyri hetta fáa tey eina sonevnda ansingarsamsýning. Talan er sum heild um eina góða og vælvirkandi skipan. Men skipanin er gomul, hon gongur heilt aftur til 1984. Tørvur er tí á dagføringum og øðrum ábótum. Millum annað hevur samsýningin staðið í stað í alt ov nógv ár.

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum hevur tí sett sær fyri – í samráði við kommunurnar – at dagføra og endurskoða skipanina.

Ein arbeiðsbólkur verður helst settur í næstum at gera uppskot til broytingar.



### SKIPAN AV EFTIRLITI

Sambært § 19, stk. 1, í eldralógini hava kommunurnar eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum sambært lógini. Í stk. 3 er heimilað landsstýrismanninum at gera reglur hesum viðvíkjandi. Løgtingsins umboðsmaður hevur staðfest, at landsstýrismaðurin ikki hevur brúkt hesa heimild og hevur ikki gjørt reglur um eftirlit.

Løgtingsins umboðsmaður hevur somuleiðis staðfest, at hóast tað í eldralógini er ásett, at kommunurnar skulu hava eftirlit við teimum tænastum, sum tær veita sambært eldralógini, er einki eftirlit skipað, síðan økið var lagt út til kommunurnar 1. januar 2015.

Umboðsmaðurin er komin til ta niðurstøðu, at vantandi reglur frá Almannamálaráðnum eru orsøkin til hesa støðu, og hevur tí sent skriv til Almannamálaráðið, har hann mælir ráðnum til sum skjótast at gera reglur um eftirlit til kommunurnar at fyrisita eftir.

Almannamálaráðið hevur síðani vent sær til Kommunufelagið, og á fundi partanna millum var semja um at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá ráðnum og Kommunufelagnum, sum skjótast møguligt skal koma við einum uppskoti um, hvussu kommunurnar kunnu skipa eitt eftirlit, sum skal vera við til menna tænastustøðið á økinum.

## Heilsuøkið

### VIÐTALUHØLI VERÐA VERANDI KOMMUNAL

Kommunulæknaskipanin er í dag soleiðis, at meðan landið rindar løn til kommunulæknan, skulu kommunurnar syrgja fyri hølum, innbúgvi, amboðum, útgerð og líknandi. Eisini skulu kommunurnar útvega bústað til avloysarar.

Síðan ein arbeiðsbólkur í 2010 handaði eitt álit um nýggja kommunulæknaskipan, hava skiftandi landsstýri arbeitt við eini ætlan um, at landið skal yvirtaka allar tær uppgávur, sum kommunurnar hava havt í sambandi við kommunulæknaskipanina, soleiðis at talan verður um eina landsuppgávu burturav. Ætlanin er at umskipa primeru heilsutænasturnar hjá landinum soleiðis, at landið verður býtt upp í heilsuøki við heilsudeplum, har fleiri kommunulæknar saman við øðrum heilsustarvsfólki skulu starvast.

Hendan ætlan er nú partvís broytt. Sambært Heilsumálaráðnum er avgerð tikin um, at landið fer ikki at yvirtaka viðtaluhølini, tey vera framvegis kommunal. Men sjálv ætlanin um at umskipa økið í heilsuøki heldur tó fram, so landið fer helst at yvirtaka fleiri av hinum uppgávunum, ið kommunurnar hava í dag. Kommunurnar fara sostatt eisini frameftir at vera ein partur av kommunulæknaskipanini, men tó ein minni partur enn í dag.

### ILLA UMHUGSAÐAR BROYTINGAR Í STUÐLI TIL HJÁLPARRÁÐ

Í skrivi dagfest 29. januar 2024 hevur Heilsutrygd boðað frá, at stuðul til hjálparráð ikki longur verður latin borgarum á røktarheimum og sambýlum. Hetta er sambært Heilsutrygd í samsvari við kunngerð um ískoyti til gjald fyri ávís hjálparráð.

Hjálparráð eru útgerð, amboð og annað, sum verða brúkt bæði á bústovnum og í heimasjúkrarøktini. Kommunurnar meta seg ikki hava heimild at gjalda fyri hjálparráð, og tískil má borgarin sannlíkt halda útreiðslurnar. Kommunufelagið metir tað vera sera óheppið, at slík avgerð verður tikin av Heilsutrygd, uttan at kommunur og borgarar verða kunnað frammanundan. Eisini er hetta brot á tær avtalur, sum vóru galdandi, tá eldraøkið var lagt út. Skulu kommunurnar nú rinda fyri hjálparráð, má fígging fylgja við frá landinum.

Málið er viðgjørt á fundi við Heilsumálaráðið í mars í ár. Heilsumálaráðið kannar í løtuni málið hjá Heilsutrygd. Málið verður síðani tikið upp aftur millum Kommunufelagið og Heilsumálaráðið.

## Bústaðarøkið

### KOMMUNUR HEIMILD AT STOVNA ALMANNAGAGNLIG BÚSTAÐARFELØG SAMAN VIÐ BÚSTØÐUM

Lógin um Húsalánsgrunn er nú til viðgerðar í løgtinginum. Ein av ætlaðu broytingunum er at geva kommununum heimild til at stovna almannagagnlig bústaðarfeløg saman við Bústøðum. Skotið verður upp, at kommunan letur fígging samsvarandi við millum 10 % og 20 % av samlaða útveganarkostnaðinum. Innskot kann eisini latast sum byggilendi og byggibúning. Restin av fíggingini verður fingin til vega við innskoti frá Húsalánsgrunninum – sum ikki má vera minni enn innskotið frá kommununi – og við láni, sum hevur trygd í ognum bústaðarfelagsins.

Kommunufelagið hevur í sínum hoyringarskrivi víst á, at ásetingin um, at bústaðarfeløgini skulu fíggjast við trygd í egnum ognum fer at hava við sær ein ov stóran fíggingarkostnað og harvið eisini høga húsaleigu. Havandi í huga, at fíggingartreytirnar eru væl strangari uttanfyri miðstaðarøkið, kann tað eisini hava tað við sær, at húsaleigan verður væl hægri á bygd enn í miðstaðarøkinum. Betur var um lánini vóru tikin við trygd í samlaðu ognum hjá Bústøðum. Uppaftur betur hevði verið, um landið læt Bústaðir læna eftir somu treytum sum landskassin. Hetta hevði tryggjað bíligastu leiguna, og tað er hóast alt landið, ið borgar tá av tornar.

Eisini hevur Kommunufelagið víst á, at skulu kommunur av álvara vera við í fígging av almannagagnligum bústøðum, er neyðugt at áseta, at møgulig innskot frá kommununi verða hildin uttanfyri skuldarmarkið hjá kommununi. Talan er um eina íløgu, sum bæði liggur uttanfyri kommununa í serstakari løgfrøðiligari eind, og sum hevur hóskandi trygd í komandi leigugjaldi.

Somuleiðis hevur Kommunufelagið víst á, at skal ein veruligur væl virkandi leigumarknaður taka seg upp í Føroyum, er neyðugt við einari skipan við býlisstuðli eins og í øðrum Norðurlondum. Er ongin býlisstuðul, verða í størstan mun tey vælbjargaðu, ið hava ráð at búgva í almannagagnligum bústaði, og tað kann ikki vera rætt.



# 4. Arbeiðsmarknaðurin

## Lønarlyftið er nú veruleiki

Sambært samgonguskjalinum skuldu lægst løntu bólkarnir á umsorganarøkjunum fáa eitt lønarlyft, og frá 1. januar 2024 er hetta vorðið veruleiki. Teir bólkar, ið hava fingið lønarlyft, eru: námsfrøðingar (1.039 kr. pr. mánað), námsfrøðiligir atstøðingar (2.896 kr. pr. mánað), hjálparfólk á stovni (1.065 kr. pr. mánað), heilsurøktarar (1.391 kr. pr. mánað), heilsuhjálparar við útbúgving (1.448 kr. pr. mánað) og heilsuhjálparar uttan útbúgving (1.096 kr. pr. mánað).

Talan er í stóran mun um fólk, ið starvast hjá kommununum, og roknað verður við, at lønarlyftið kostar kommununum umleið 35 mió. kr. árliga í 2024. Samanlagt fer hetta tó ikki at kosta kommununum nakað, tí kommunurnar fáa endurgjald fyri lønarlyftið. Hetta verður gjørt soleiðis, at landið frá 1. januar 2024 átekur sær partin hjá kommununum av sokallaða pensjónistafrádráttinum (§ 3, stk. 4, í ásetingarlógini). Tað hevur verið soleiðis, at allir fólkapensjónistar hava fingið afturborið 3.000 kr. árliga í landsskatti og 3.000 kr. árliga í kommunuskatti. Ætlanin er nú í staðin at afturbera 6.000 kr. úr landsskatti og onki í kommunuskatti.

## Heilsurøktarar og heilsuhjálparar løn undir útbúgving?

Seinastu árini hava verið merkt av manglandi arbeiðsmegi á nógvum økjum. Ikki minst hava kommunurnar havt avbjóðingar við at útvega faklærd fólk til dagstovnaøkið og eldraøkið.

Harumframt hevur tað víst seg, at áhugin at útbúgva seg til heilsuhjálpara, heilsurøktara og námsfrøðihjálpara er alt ov lítil í mun til tørvin á hesum starvsbólkum. Fyri at tryggja at fleiri velja at fara undir nevndu útbúgvingar, hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið í samráði við Kommunufelagið sett ein arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar fyri, at nevndu útbúgvingar kunnu fáa løn undir útbúgving.

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum er at gera ítøkilig uppskot til eina skipan, har tey lesandi kunnu fáa løn ella hægri samsýning enn verandi lestrarstuðul undir útbúgving. Í fyrstu atløgu er lønarspurningurin høvuðskjarnin í arbeiðinum og ikki innihaldið í sjálvum útbúgvingunum. Arbeiðsbólkurin kann tó taka innihaldið upp, um so er, at hetta verður hildið at vera neyðugt.

Arbeiðsbólkurin er mannaður við umboðum fyri: Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Undirvísingarstýrið, Heilsuskúla Føroya, Kommunufelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Miðað verður ímóti, at arbeiðsbólkurin hevur eitt uppskot klárt í mai 2024.

Hendingar í árinum

## Bygningar á leigaðari grund skapa avbjóðingar

Ein kommuna hevði afturvendandi trupulleikar við bygningum á leigaðari grund – vanliga á havnarøkinum – og vendi sær tí til skrivstovuna fyri at fáa vegleiðing um, hvussu hetta kundi skipast betri. Trupulleikin, ið oftast kom fyri, var, at bygningur skifti eigara, uttan at kommunan var vitandi um hetta. Harvið stóð kommunan eftir við einum leigusáttmála, sum ikki var við aktuella eigaran av bygninginum. Kommunan vísti sum dømi á eitt mál, har ein bygningur hevði skift eigara, uttan at kommunan varð kunnað ella tikin við upp á ráð viðvíkjandi leigusáttmálanum. Kommunan upplýsti eisini, at tað var vanlig mannagongd at játta, at nýggjur eigari kundi yvirtaka leigusáttmálan.

Yvirskipað kundi skrivstovan vísa á, at tað í útgangsstøðinum ikki er nakað løgfrøðiligt til hindurs fyri, at ein bygningur á leigaðari grund kann skifta eigara, uttan at útleigarin (kommunan) veit av hesum. Hava partarnir ein ráðgeva/advokat, er vanlig mannagongd tó, at mann fyriheldur seg til leiguavtaluna um lendið og setir seg í samband við útleigara. Men hetta er ikki eitt krav, og tí kemur fyri, at bygningurin verður handlaður, uttan at lendisútleigarin veit av tí.

Samstundis er onki krav um, at kommunan skal góðtaka at fáa ein nýggjan leigara av økinum, uttan so at hetta er avtalað. Hetta kemst av, at talan løgfrøðiliga er um sonevnt debitorskifti, sum í útgangsstøði krevur samtykki frá kreditori, áðrenn kreditorur (útleigarin) verður bundin.

Hetta og ymisk onnur viðurskifti kunnu skjótt gera viðurskiftini tvørlig millum partarnar, og tað hava partarnir sjáldan áhuga í. Í ítøkiliga málinum mælti skrivstovan tí til, at kommunan tosaði við nýggja (bygnings)eigaran um, at rættast er, at viðkomandi – við játtan frá verandi leigara – yvirtók leigusáttmálan. Í slíkum føri kann vera hóskiligt at gera eitt ískoyti til sáttmálan, har eisini nýggjar treytir verða settar í, t.d. at bygningurin ikki kann skifta eigara, uttan at nýggi eigarin hevur leiguavtalu við kommununa, ella at kommunan játtar at lata nýggja eigaran yvirtaka skyldurnar sum leigari eftir sáttmálanum.

Hesar treytir eiga at verða tinglýstar á rætta stað. Og tað skuldi gjarna fyribyrgt, at bygningin framyvir kann skifta hendur, uttan at kommunan veit av tí.

At enda viðmælti skrivstovan kommununi at meta um allar leigusáttmálar, tá ið umbøn kemur at lata ein nýggjan leigara koma inn. Tað er upplagt høvi at fáa sett tær treytir, sum kommunan gjarna vil hava inn, til dømis góðkenning av nýggjum leigara, uppsagnartíð, regulering av leigugjaldi, skilhaldsreglur, røkt av økinum, hóskandi depositum at rætta uppá viðurskifti fyri leigarans rokning, o.s.fr. Hetta eru alt viðurskifti, sum kunnu skapa trupulleikar og avbjóðingar millum partarnar, eins og fyri grannar og aðrar leigarar á økinum. Tí kann vera skilagott at hava greiðar reglur hesum viðvíkjandi.



# 5. Skúli og mentan

## Endurskoðan av fólkaskúlalógini

Undanfarna landsstýri setti í november 2021 ein arbeiðsbólk at hyggja nærri at fólkaskúlalógini og tørvinum á møguligum tillagingum. Arbeiðsbólkurin var mannaður við umboðum frá Barna- og undirvísingarmálaráðnum, Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Kommunufelagnum, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Fólkaskúlaráðnum, Námsvísindadeildini og Felagnum Heim og Skúli.

Sitandi landsstýri gjørdi av at halda fram við tí arbeiði, sum var komið væl áleiðis, tá ið løgtingsval varð útskrivað.

Nýggi landsstýrismaðurin heitti á arbeiðsbólkin um at halda fram við arbeiðinum, vísandi til, at fleiri av uppgávunum, tey sótu við, sampakkaðu væl við tey yvirskipaðu stevnumiðini, sum sett vóru í samgonguskjalið.

Á krossmessu 2023 varð álitið frá arbeiðsbólkinum handað landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum. Í álitum vóru til samans 18 tilmæli innan ymisk innihaldslig og bygnaðarlig øki.

Hin 20. februar 2024 var aðalorðaskifti í løgtinginum um fólkaskúlan, og í framløguskrivi sínum lýsti landsstýrismaðurin nøkur av høvuðstilmælunum soleiðis:

Leikluturin hjá kommunum á skúlaøkinum er í stóran mun at veita fysisku karmarnar, sum hava við undirvísingina at gera. Av týdningi fyri kommunurnar er tí sjálvandi serliga viðurskiftini viðvíkjandi floksstødd. Síðan tilmælið varð handað landsstýrismanninum, er eitt uppskot komið í løgtingið um júst hesi viðurskifti.

Kommunufelagið var rættiliga atfinningarsamt móti tí uppskoti, sum varð sent til hoyringar, og fer framhaldandi at fylgja málinum væl, nú uppskotið í nakað broyttum líki er lagt fyri løgtingið.

## Markamót millum kommunurnar og Sernám

Í august 2022 boðaði Sernám dagstovnum kring landið frá skerdum virksemi á dagstovnaøkinum galdandi til juni 2023. Í hesum tíðarskeiði var í høvuðsheitum ikki møguligt at fáa sálar- ella sernámsfrøðiliga ráðgeving í nýggjum málum. Orsøkin til skerda virksemið var avmarkað starvsfólkaorka.

Kommunufelagið fekk fráboðan um skerdu tænastunar frá Sernámi umvegis limakommunur og tók beinanvegin málið upp við avvarðandi aðalráð. Felagið vísti millum annað á sína misnøgd um, at ein landsstovnur á henda hátt avmarkaði sínar tænastur á dagstovnaøkinum. Serliga at tað hendi uttan nakra samráðing við ella varning til kommunurnar, og at kommunurnar tískil ongan møguleika høvdu at fyrireika seg upp á nýggju støðuna.

Skerda tænastustøðið stóð við til á sumri 2023, og í sama tíðarskeiði samskifti Kommunufelagið við Barna- og útbúgvingarmálaráðið um støðuna á økinum. Felagið vísti á ein yvirskipaðan tørv á at greina markamótini millum land og kommunur. Serliga var tørvur á einari greiðari støðutakan til, hvørjar sernámsfrøðiligar, sálarfrøðiligar og aðrar sertænastur verða veittar frá landinum, og hvørjar tænastur kommunurnar sjálvar eiga at veita. Felagið bar vegna kommunurnar fram tað sjónarmið, at kommunurnar mest av øllum hava tørv á at vita, hvør tænastan frá landinum er, soleiðis at kommunurnar kunnu raðfesta síni námsfrøðiligu tilboð upp ímóti hesum.

Í februar 2023 var fundur á umsitingarligum stigi millum leiðslu og viðkomandi starvsfólk í felagnum og aðalráðnum. Á fundinum varð gjørt av, at partarnir skuldu fara hvør til sítt og gera eina nærri lýsing av, hvussu teir sóu sín leiklut á økinum. Fyri kommunurnar skuldi felagið millum annað lýsa arbeiðsuppgávur, sum liggja hjá kommununum at røkja, umframt markamót til Sernám. Í samráði við dagstovnanetverkið undir Kommunufelagnum gjørdu vit av at leggja hesa uppgávu hjá námsfrøðiligu ráðgevunum, soleiðis at talan gjørdist um eina fakliga væl grundaða lýsing. Úrslitið gjørdist eitt skjal, sum varð latið Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og Sernámi, og sum varð viðgjørt á felags fundi millum partarnar í mai 2023.

Kommunufelagið hevur síðani spurt eftir samsvarandi lýsingini, sum skuldi gerast fyri økið hjá landinum, og sum í stóran mun er staðsett hjá Sernámi. Felagið hevur skotið upp, at tá ið hendan lýsing fyriliggur, kann farast undir eina nærri umrøðu og neyðuga avkláring millum geirarnar. Felagið hevur í nýggja árinum fylgt upp upp á málið og kunnar limakommunurnar nærri, so skjótt sum okkurt ítøkiligt er at bera fram.

### Uppskot sent til hoyringar í løgtinginum

- At undirvísingarpartarnir verða ásettir í lógini, og at teir fevna um grunddeild (1.-3. flokk), miðdeild (4.-6. flokk) og hádeild (7.-9. flokk), og at lærugreinabýtið verður gjørt fyri hvørja deild
- At lækka undirvísingartímatalið til: grunddeild 25 tímar/viku, miðdeild 30 tímar/viku og hádeild 32 tímar/viku
- At tillaga tíma- og lærugreinabýtið við einum hóskandi býti millum tey 4 fakøkini, mállærugreinir, náttúruvísindi, mentan og samfelag og likamlig og skapandi læra
- At alis-/evnafrøði verður kravd lærugrein í hádeild við 2 tímar/viku, og at týskt verður vallærugrein í hádeild við 2 tímum/viku, og at týskt ikki skal vera førleikagevandi sum upptøkukrav til miðnám
- At víðka og menna tvílæraraskipanina og samlæring
- At tillaga floksstøddina, so at næmingatalið við skúlaársbyrjan verður 20 næmingar
- At nágreina arbeiðshættir sum verkætlanararbeiði, evniskunnandi undirvísing og verkstaðarundirvísing í fólkaskúlalógini, umframt at raðfesta eftirútbúgving innan hetta økið
- At skipa fastan leist fyri eftirútbúgvingar, sum frameftir nøkta tørvin á førleikamenning
- At menna flokslæraraskipanina, at dagføra námsætlanir og at menna handaverk og list

## Stuðulin til skúlabarnaflutning heldur fram

Í september 2023 legði landsstýrið uppskot fyri løgtingið um broyting í fólkaskúlalógini við tí endamáli at strika landskassastuðulin til skúlabarnaflutning. Stuðulin var í 2022 til samans knappar 2,3 mió. kr., og við fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024 varð lagt upp til eina samsvarandi sparing í játtanini.

Skipanarlaga verður stuðulin til skúlabarnaflutning latin kommunum, sum hava fyri neyðini at senda næmingar sínar í aðra kommunu at ganga í skúla. Talan er í flestu førum um smáar kommunur, sum ikki hava eitt neyðugt barnagrundarlag til at skipa ein vælvirkandi skúla í nærumhvørvinum. Talan kann eisini vera um kommunur, sum senda einstakar næmingar í skúla í aðrari kommunu, ella sum hava skúlasamstarv um ávís floksstig, og har skúlin liggur í aðrari kommunu



enn heimkommununi hjá næminginum. Í 2022 fingu til samans 14 kommunur hendan stuðul.

Sambært viðmerkingunum til uppskotið var endamálið við uppskotinum at javnseta allar kommunur. Kommunufelagið vísti í ummælisskrivi á, at felagið ikki metti hetta vera haldgóða grundgeving – heldur tvørtur ímóti. Víst varð á, at endurgjaldið júst er ætlað til at javnstilla kommunur, soleiðis at tær kommunur, sum hava fyri neyðini at senda børn síni í aðrar kommunu at ganga í skúla, ikki skulu bera allar eykaútreiðslurnar, ið standast av hesum. Felagið helt ætlanina við uppskotinum fram um nakað annað vera at flyta útreiðslurnar frá landskassanum til nakrar útvaldar kommunukassar, sum ofta ikki hava stóra fíggjarliga orku frammanundan.

Kommunufelagið kundi tí ikki taka undir við uppskotinum og mælti landsstýrinum til at finna aðrar neyðugar sparingar í fíggjarlógini, heldur enn at áleggja kommununum fleiri útreiðslur.

Úrslitið varð, at fíggjarnevndin skeyt upp at strika ætlaðu sparingina. Løgtingið tók undir við hesum, og seinni varð sjálvt lógaruppskotið – sum ongantíð kom úr nevnd – eisini tikið aftur. Skipanin við stuðli til skúlabarnaflutning heldur sostatt fram í óbroyttum líki.

## Málskúli fyri borgarar við øðrum máli enn føroyskt sum sítt fyrsta mál

Tørvurin á undirvísing fyri borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, er støðugt vaksandi. Fyri at tryggja eina góða integratión er umráðandi, at hesir borgarar bæði fáa møguleika fyri at ogna sær hollar førleikar at samskifta á føroyskum, at ogna sær holla vitan um samfelag og mentan í Føroyum, og at útbúgva seg innan føroysku útbúgvingarskipanin.

Kommunufelagið metir, at tørvur er á skipaðum lógarkarmum til tess at kunna tryggja eitt einsháttað, námsfrøðiliga og fakliga gott undirvísingar- og útbúgvingartilboð fyri borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. At lata ábyrgdina yvir til kvøldskúlaskipanina er ábyrgdarleyst. Tí tekur Kommunufelagið fult undir við, at ein málskúli verður skipaður sum eitt landstilboð, sum tryggjar at allir tilflytarar fáa somu undirvísingar- og útbúgvingartilboð.

## Nýggj 5-ára avtala um Sprotan

Atgongdin til orðabøkurnar á sprotin.fo varð framtíðartryggjað 11. august 2023, tá ið landsstýrið, Kommunufelagið og Sprotin undirritaðu nýggja avtalu.

Her gjørdu landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, Jonhard Mikkelsen, stjóri í Sprotanum, og formansskapurin í Kommunufelagnum, Tórbjørn Jacobsen og Heðin Mortensen, avtalu um at leingja og víðka um verandi sáttmála millum partarnar um veiting av nógv brúktu talgildu netorðabókum Sprotans.

- Sáttmálin er til gleði og gagns fyri alla ta føroysku tjóðina. Orðabøkurnar verða brúktar dagliga av flestu føroyingum. Tær eru ein týðandi táttur í menningini og varðveitingini av føroyska málinum, eins og tær fáa føroyska málið at røkka langt út í heim, segði Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, í sambandi við, at sáttmálin varð undirritaður.



Sprotin fór undir orðabókagerð fyrst í nítiárunum, og í 2015 varð avtala fyrstu ferð gjørd við landsstýrið og Kommunufelagið, sum gav øllum fría atgongd til alt orðabókatilfarið á alnótini.

- Høgliga atgongdin til orðabøkur í Føroyum er kanska eitt eindømi í heimshøpi. Slíkt hendir ikki av tilvild, og tað er av alstórum týdning framhaldandi at stuðla undir hesa skipan. Og hesum ynskja kommunurnar framhaldandi at vera partur av, segði Tórbjørn Jacobsen, formaður í Kommunufelagnum.

Sáttmálin er longdur við fimm árum, og fer umframt verandi orðabókavirksemi á alnótini at fullfíggja arbeiðið við japanskari, portugisiskari og grønlendskari orðabók. Seinni fara hesar orðabøkur í gerð: Føroyskt – franskt, italskt – føroyskt, svenskt – føroyskt og føroyskt – svenskt.

## Nýggja bókasavnslógin – enn er óvissa um stuðulin í 2024

Tann 1. januar 2024 kom nýggja bókasavnslógin í gildi, og gamla lógin frá 2001 fór í søguna. Undir gomlu lógini fingu kommunurnar ein árligan rakstrarstuðul á samanlagt 2,8 mió. kr. Hesin stuðul var í einari fastari legu, har somu kommunur fingu somu upphædd hvørt ár.

Við nýggju lógini verður farið frá rakstrarstuðli til "stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum". Á fíggjarlógini fyri 2024 er stuðulin tann sami sum undanfarin ár. Men kunngerðin, sum skal siga, hvørjar treytirnar eru fyri at fáa stuðul, er ikki lýst enn.

Enn er sostatt púra óvist, hvussu stuðulin til kommunalu bókasøvnini verður býttur í 2024.

## Sáttmáli við Fróðskaparsetrið

Fróðskaparsetur Føroya og Kommunufelagið gjørdu í 2023 eina 5-ára avtalu um at menna og skipa granskingarsamstarv millum partarnar, sum báðir partar hava áhuga í og fáa ágóðan av. Kommunufelagið vónar við hesum at stuðla undir gransking, sum viðger og kemur við møguligum loysnum, sum kunnu nýtast av kommununum til at loysa ítøkiligu avbjóðingarnar, sum kommunurnar fara at møta í framtíðini. Í sama viðfangi fær Setrið størri innlit í kommunala geiran og virkisøkini hjá kommununum. Tí verður talan um samstarv, sum er til gagns fyri báðar partar.

Tann granskingin, sum samstarvsavtalan fevnir um, skal skapa nýggja varandi vitan, sum virkar fyri at betra um og at menna tær tænasturnar, sum kommunurnar veita.

Samstarvsavtalan er í fyrsta umfari galdandi frá 1. november 2023 til 31. oktober 2028.

### Hendingar í árinum

## Ósamsvar millum byggisamtykt og BK17

Ein kommuna var vorðin varug við, at samsvar ikki var millum loyvda byggistigið í byggisamtyktini og tað byggistig, sum bygningskunngerðin BK17 ásetti. Spurningurin var tí, hvørjar reglur kommunan skuldi halda seg til í einum ítøkiligum máli.

Skrivstovan vísti á, at hetta var eitt ivamál, sum løgtingið tíbetur tók greiða støðu til, tá ið byggilógin (sum heimilar BK17) bleiv til. Greitt varð eisini nærri frá hesum í viðmerkingunum til lógina: "Í førum, har ein kommuna hevur gjørt brúk av síni heimild eftir býarskipanarlógini, koma tær ásetingarnar fram um møguligar reglur, sum landsstýrismaðurin setur í gildi við heimild í §§ 5 og 6 í byggilógini." (lm. nr. 157/2011)

Niðurstøðan hjá skrivstovuni var tí, at kommunan í viðurskiftum fevnd av hesum reglum – §§ 5-6 í byggilógini – skal fylgja egnari byggisamtykt. Hevur byggisamtyktin ikki viðkomandi ásetingar, skal BK17 fylgjast.




# 6. Umhvørvi og ferðavinna

## Ferðavinnulógin – kommunurnar skulu loysa málið um gongd í haga

Tað mest umrødda málið í løtuni man vera málið um gongd í haga. Fleiri undanfarin landsstýri hava arbeitt við málinum, men í vár var umsíðir lógaruppskot lagt fram í málinum.

Hóast lógaruppskotið í sera stóran mun leggur uppgávuna til kommunurnar at skipa gongd uttangarðs, so hava kommunurnar, so at siga, ikki verið partur í lógarfyrireikandi arbeiðinum. Stýrið í Kommunufelagnum hevur saman við øðrum fingið yvirskipaða kunning um málið á tveimum stuttum hoyringarfundum, men hevur ikki luttikið beinleiðis í arbeiðinum við lógaruppskotinum.

Við uppskotinum verður frítt at ganga uttangarðs og fram við strondini. Kommunur skulu gera ferðavinnuætlan, ið skipar gongdina í høgunum í kommununi, m.a. við at gera nýggjar gøtur. Eisini skulu kommunurnar í samráði við avvarðandi partar gera skilhaldsreglur, sum øll, sum ferðast í økinum, skulu fylgja. Kommunur skulu harumframt halda gomlu bygdagøturnar.

Burðardygdargjald á 225 kr. verður lagt á hvørt útlendskt ferðafólk, ið kemur til Føroya. Inntøkurnar verða latnar sum stuðul til at skipa ferðavinnu. Kommunur fáa 50 %, bygdin fær 25 %, og tey, sum varða av jørðini, fáa 25 %.

Uppskotið áleggur kommununum stórar íløgur og eisini umsiting. Mett verður, at uppskotið einans gevur kommunum samanlagt umleið 15 mió. kr. árliga. Greitt er, at væl meira fígging má fylgja við, um kommunurnar skulu kunna røkja sínar skyldur sambært uppskotinum.

Landið hevur stórar inntøkur av ferðavinnu, meðan fleiri kommunur hava undirskot av ferðavinnuni. Men fíggjarliga kostar uppskotið landinum onki, hinvegin fær landskassin eykainntøkur av uppskotinum. Rættast var tí um landið læt meira fígging til kommunurnar, um landið veruliga ætlar, at kommunurnar skulu loysa málið fyri landið.

Kommunufelagið hevur onki hoyringarskriv latið inn um málið. Ásannandi, at bæði avbjóðingarnar og áskoðanirnar í kommununum eru so ymiskar, var tikin avgerð um at lata hvørja kommunu sær gera viðmerkingar um málið.



## Tænastugjald á tóm hús – lógaruppskot er ávegis

Kommunurnar hava í mong ár víst á, at vaksandi talið av tómum húsum kring alt landið er ein útreiðsla fyri kommunurnar. Kommunurnar hava tí í nógv ár eftirlýst eina heimild til at leggja tænastugjøld á bústaðir, har ongin býr. Kommunurnar hava longu heimild at áleggja gjøld fyri sínar tænastur, men skal tað gerast undir galdandi lóggávu, má gjaldið leggjast á øll hús í kommununi og ikki bara tey, sum standa tóm. Tað, sum kommunurnar hava tørv á, er sostatt ein heimild til bara at leggja gjøld á tey húsini, har ongin er skrásettur at búgva.

Tað hevur verið sera trupult at fáa undanfarin landsstýri at gera nakað við málið. Men sitandi landsstýri hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri, at "heimild verður latin kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi".

Hetta arbeiðið er longu farið í gongd. Løgmálaráðið, sum umsitur kommunumál, arbeiðir við at útvega neyðugu lógarheimildina. Roknað verður við, at lógaruppskot verður lagt fram longu í heyst.

## Eftirlýsa bústaðarskyldu

Umframt arbeiðið við tænastugjøldum hava kommunurnar eftirlýst møguleikan at áseta bústaðarskyldu. Eisini hetta var partur av samgonguskjalinum hjá nýggju samgonguni:

Heimild verður latin kommunum at […] áseta bústaðarskyldu í sambandi við nýggjar kommunalar byggiætlanir.

Skrivstovan hjá Kommunufelagnum hevur í fleiri ár javnan fingið fyrispurningar um, hvørjar møguleikar føroyskar kommunur hava fyri at áleggja bústaðarskyldu. Fyrispurningar koma bæði um verandi bústaðarøki og um ætlaðar útstykkingar, og felags fyri teir er, at kommunurnar antin ynskja ella forvitnast um bústaðarskyldu sum bústaðarpolitiskt amboð.

Í Føroyum hava vit ongar lógarásetingar um bústaðarskyldu. Tí stendur tað sum útgangsstøði eigaranum av einum bústaði frítt, um bústaðurin verður nýttur til fastan bústað ella ikki. Eigarin kann heldur ikki krevjast at leiga bústaðin út, tí stendur honum eisini frítt at lata bústaðin standa tóman.

Her er sostatt talan um eitt øki, har lógarásetingar í stóran mun vanta. Tí er tað gott, at landsstýrið umsíðir fer undir at regulera hesi viðurskiftini. Og eins og við tænastugjøldunum verður roknað við, at úrslitið av hesum arbeiði fer at síggjast á heysti 2024.

### Hendingar í árinum

## Frá bygdarráði til býráð

Í árinum fór ein kommuna upp um 1.500 íbúgvar. Kommunustýrið – bygdarráðið – vildi tí taka støðu til, um tað framyvir skuldi nevna seg sum býráð. Umsitingin hjá kommununi vendi sær tí til skrivstovuna við fyrispurningi um, hvørjar reglur eru galdandi hesum viðvíkjandi. Eitt nú var ivamál um, hvørt broytingin kundi fremjast frá degi til dags; um tað kravdi broyting av kommunustýrisskipanini; og um neyðugt var at bíða við broytingini til valskeiðið var av.

Skrivstovan vísti á, at tað var trupult at siga nakað ítøkiligt um hesar spurningar. Upprunaliga uppskotið til galdandi kommunustýrislóg innihelt ikki nakran skilnað millum bygdarráð og býráð. Tankin var heldur, at allar kommunur skuldu stýrast av einum kommunustýri, uttan mun til støðd.

Løgtingið tók ikki undir við hesum partinum av uppskotinum. Ein samd rættarnevnd setti sostatt fram broytingaruppskot. Nevndin vísti á, at í kommunulógini frá 1972 vórðu heitini ”bygda(r)ráð” í kommunum við færri enn 1.500 íbúgvum og ”býráð” í kommunum við 1.500 íbúgvum ella fleiri. Nevndin ynskti at varðveita hesi heiti og setti tí fram broytingaruppskot, sum løgtingið síðani tók undir við.

Broytingaruppskotið innihelt ikki nakrar nærri ásetingar ella vegleiðingar til, hvussu eitt møguligt skifti frá bygdarráð til býráð skuldi fara fram. Skrivstovan metti tí heimildina vera breiða fyri tær kommunur, sum lúka kravið um íbúgvaratal. Samanumtikið varð mett, at mest talaði fyri, at tað er upp til kommunustýrið at gera av, nær eitt slíkt skifti skuldi fáa virknað.

Hendingar í árinum

## Hvørjar gávur kann borgarstjórin geva?

Eitt hátíðarhald varð hildið í sambandi við, at ávíst áramál var síðani, at ein stovnur læt upp. Vegna kommununa læt borgarstjórin stovninum eina gávu. Talan var um eitt týðandi hátíðarhald, og gávan hevði tí ávísa støðd, sum borgarstjórin hevði ásett eftir samskifti við umsiting. Kommunan hevði eisini spurt seg fyri hjá aðrari kommunu um teirra mannagongdir.

Kommunustýrið varð kunnað um gávuna, og ivamál tók seg síðani upp, hvørt borgarstjórin hevði heimild at lata gávuna uttan serstaka játtan frá kommunustýrinum.

Skrivstovan vísti á, at kommunan hevur ein lógligan áhuga í at varðveita góð sambond við starvsfólk, stovnar og aðrar samstarvsfelagar. At geva gávur í sambandi við umboðan er tí ein partur av virkseminum hjá kommununi.

Tað er borgarstjórin, sum umboðar kommuna, og borgarstjórin hevur tí heimild at lata gávur, sum mugu metast at vera vanligar til ítøkiliga høvið. Formliga skal viðkomandi játtan vera til endamálið, og hetta kann til dømis vera serstøk umboðanarjáttan ella yvirskipað játtan til fyrisitingina hjá kommununi, sum borgarstjórin hevur ábyrgd av.

# 7. Elorkuøkið

## Elveitingarlógin til viðgerðar í løgtinginum

Umfatandi broytingar í elveitingarlógini eru nú til viðgerðar í løgtinginum. Tilgongdin má sigast at hava verið drúgv, tí nógv álit og frágreiðingar eru gjørd um framtíðar elkervið í Føroyum seinastu 15 árini.

Tá undanfarna samgonga tók við á heysti 2019, setti hon út í kortið stórar og kollveltandi ætlanir á elorkuøkinum. Ætlanir, ið kommunurnar sum eigarar av SEV, als ikki kundu góðtaka. Fyri at tryggja eina framhaldandi samhaldsfasta elskipan í Føroyum, fóru kommunurnar saman við SEV tí undir samráðingar við undanfarna landsstýri. Úrslitið var semjan millum landsstýrið, kommunurnar og SEV frá 22. mars 2022.

Síðan semjan varð undirskrivað, hava orkumyndugleikin og SEV – sambært punkti 5 í semjuni – gjørt eina tíðarfesta ætlan fyri, hvussu elframleiðslan skal økjast komandi árini. Eisini hevur ein arbeiðsbólkur, mannaður av umboðum fyri Kommunufelagið, Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna, í desember 2023 handað landsstýriskvinnuni eitt tilmæli um sølumarknað sambært punkti 7 í semjuni frá 22. mars 2022.

Hóast núverandi samgonga hevur sett sær fyri at dagføra elveitingarlógina við støði í semjuni frá 22. mars 2022, so var ikki alt, sum ásett var í semjuni, avgreitt, tá uppskotið var lagt fram. Enn situr ein arbeiðsbólkur og arbeiðir við punkti 10 í semjuni, sum snýr seg um, hvussu stórir kundar, sum framleiða til egna nýtslu, kunnu verða knýttir í elnetið. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt, áðrenn tingið fer til hús, og kann tí vónandi gerast partur av endaliga lógaruppskotinum.

Verður lógaruppskotið samtykt, verður tað staðfest, at vit hava bara eittans elnet í Føroyum, og tað er elnetið hjá SEV. Eisini verður sligið fast, at øll nýggj elframleiðsla verður boðin út eftir einari langtíðarætlan, og at SEV – umvegis dótturfelag – kann luttaka í kappingarútsettum framleiðsluvirksemi á jøvnum føti við aðrar framleiðarar.

Við lógaruppskotinum fer elveitingarlógin eisini at fevna um fjarhitavirksemi. Hesum hevur Kommunufelagið tó mælt frá, tí felagið heldur tað var greiðari, um tað var gjørt í serstakari lóg. Mælt varð tí til at seta ein arbeiðsbólk við serkønum og umboðum fyri kommunurnar og Fjarhitafelagið at gera uppskot til slíka serstaka lóg. Men hesum tók landsstýrið ikki undir við.

Við í uppskotinum eru eisini greiðari heimildir til ognartøku í sambandi við orkuútbyggingar umframt til at leggja ravmagns- og fjarhitaleiðingar gjøgnum lendi.





# 8. Annað virksemi í húsinum

Undir Kommunufelagnum er eisini annað virksemi, sum stutt verður greitt frá niðanfyri.

## Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Kjarnuuppgávan hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum er at samráðast við fakfeløg um sáttmálar og um løn- og setanarviðurskifti fyri starvsfólk, ið starvast á kommunala sáttmálaøkinum. Harumframt hevur felagið til uppgávu at vegleiða arbeiðsgevarunum um lønar- og setanarviðurskifti, flokkingarmál, sáttmálaspurningar og onnur arbeiðsmarknaðarmál. Fyri at røkka okkara arbeiðsgevarum, starvsfólkunum í kommunalu umsitingum o.ø. raðfestir felagið dagliga samskiftið, ið okkara starvsfólk hava við starvsfólk í kommunalu umsitingunum kring landið.

### SAMRÁÐINGARHEIMILDIN HJÁ KOMMUNUNUM

Heimildina at samráðast hevur felagið frá eigarunum, Kommunufelagnum, SEV og IRF. Hóast hetta hevur Fíggjarmálaráðið við ásetingini í § 5, stk. 5, í kommunustýrislógini eina góðkennandi heimild viðvíkjandi sáttmálum og lønum, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ger.

Gjøgnum tíðina hava verið avbjóðingar í samstarvinum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið um, hvussu langt góðkennandi heimildin røkkur. Hesi viðurskifti eru í dag væl skipað, samstarvið er gott og byggir í útgangsstøðinum á rammuavtaluna frá 2021.

Í rammuavtaluni hava partarnir gjørt semju um samstarv um sáttmálasamráðingar og annað á almenna/kommunala arbeiðsmarknaðinum.

Ein av fyrimununum við rammuavtaluni er, at partarnir tryggja eitt javnt lønarlag innan almenna og kommunala geiran.

### LØNARLYFT OG STYTT ARBEIÐSVIKA

Lønarlyft og stytt arbeiðsvika eru viðurskifti, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur arbeitt nógv við í árinum. Landsstýrið, sum tók við um ársskiftið í 2023 gjørdi av, at nøkur av lægst løntu starvsfólkum á umsorganarøkinum skuldu hava eitt lønarlyft. Landsstýrið boðaði frá, at teir bólkar, ið verða fevndir av lønarlyftinum eru: námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heima- og heilsuhjálparar. Hesi starvsfólk arbeiða í stóran mun á kommunala sáttmálaøkinum. Tí hevur hetta arbeiðið at áseta lønarlyftið, og ikki minst hvussu kostnaðurin av lønarlyftinum skal endurgjaldast kommununum, fylt nógv í 2023.

Stórur dentur er lagdur á, at lønarlyftið ikki er ein partur av samráðingunum. Lønarlyftið hevur havt sína ávirkan á samskiftið í samráðingunum, men her hevur leiðslan í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum verið púra greið í málinum: Lønarlyftið er eitt politiskt átak hjá sitandi landsstýri. Lønarlyftið verður avgreitt undir samráðingunum, men er ikki til samráðingar.

Lønarlyftið er galdandi frá 1. januar 2024.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur luttikið í fylgibólki, sum landsstýrið hevur sett í sambandi við politiska ynskið hjá landsstýrinum um at stytta arbeiðsvikuna úr 40 tímum niður í 37 tímar við lóg. Fylgibólkurin er mannaður við umboðum frá fakfeløgunum og almennu/kommunalu- og privatu arbeiðsgevarunum.

Innleiðandi fundir vóru áðrenn summarfrítíðina í 2023 við framløgum frá Gjaldstovuni, Búskaparráðnum, Hagstovuni, Landsbankanum og øðrum.

Gjaldstovan og Hagstovan hava havt framløgur um møguligar avleiðingar av at stytta arbeiðsvikuna, harundir kostnaðin av styttingini fyri almenna/kommunala og privata arbeiðsmarknaðin og ávirkanina á framtíðar starvsfólkatørvin o.a.

Onnur umboð, harímillum Súsanna Olsen, Erika Heyfield, Regin Berg og Jan Otto Holm hava eisini verið og greitt frá fyrimunum og vansum við at stytta arbeiðsvikuna.

Landsstýriskvinnan í arbeiðsmarknaðarmálum, Ingilín D. Strøm, hevur havt samráð við partarnir hvør sær um teirra sjónarmið. Síðani er málið farið til viðgerðar í landsstýrinum.

Partarnir í trípartasamráðnum frættu síðani ikki aftur frá landsstýrinum fyrr enn fyrrapartin í 2024, tá partarnir aftur vórðu kallaðir á fund hvør í sínum lagi. Umboð fyri landsstýriskvinnuna kunnaðu tá um, at partarnir skuldu vænta broytingar í politisku ætlanini um at stytta arbeiðsvikuna, og at nærri kunning fór at koma um hesi viðurskifti.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í hesum máli givið til kennar, at arbeiðstíðin er ein av týdningarmestu spurningunum í eini sáttmálasamráðing. Ein spurningur, sum hevur beinleiðis ávirkan á fíggjarligu viðurskiftini hjá kommununum – og tí eisini ein uppgáva, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at loysa við samráðingarborðið. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er ikki ímóti, at arbeiðsvikan verður stytt niður í t.d. 37 tímar, men felagið hevur ta fatan, at hetta skal gerast í samráðingum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

### SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR 2023

Tá takast skal samanum sáttmálasamráðingarnar í 2023, er neyðugt at taka aftur í aftur løgtingsvalið í 2022 og ávirkanina, sum landsstýrið fekk á víðari samráðingarnar. Støðgur kom í samráðingarnar á heysti í 2022 orsakað av løgtingsvalinum; bíðað varð eftir, at landsstýrið skipaði seg av nýggjum.

Nýggja landsstýrið hevur gjørt av, at arbeiðast skuldi við at stytta arbeiðsvikuna á almenna/kommunala og á privata arbeiðsmarknaðinum úr 40 tímum niður í 37 tímar um vikuna við lóg. Afturat hesum gjørdi landsstýrið av, at teir lægst løntu starvsbólkarnir innan umsorganar- og barnaansingarøkið skulu hava eitt lønarlyft.

Fíggjarligu karmarnir og framtíðarútlitini broyttust eisini í tíðarskeiðinum; talan var um munandi lønarhækkanir, samanborið við úrslitið av semingini við bæði Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið í ávikavist januar og februar 2022.

### STARVSFELAGIÐ OG HEILSUHJÁLPARAFELAGIÐ

Fyri sáttmálarnar, sum vóru undirskrivaðir í fyrru helvt av 2022 við ávikavist Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið, vóru lønarhækkanirnar settar saman í prosentum og krónum soleiðis:

- Tann 1. januar 2022 hækkaðu lønirnar 1,25 %, hóast sáttmálarnir gingu út í oktober 2021
- Tann 1. oktober 2022 hækkaðu lønirnar fyri lægru lønirnar við kr. 740 um mánaðin og nakað minni fyri hægru lønirnar: kr. 540
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,75 %

### HEILSURØKTARAFELAGIÐ

Heilsurøktarafelagið skrivaði, sum fyrsta fakfelagið á kommunala sáttmálaøkinum, undir sáttmála aftaná at nýggja landsstýrið tók við um ársskiftið 2023.

### KARMARNIR

Karmarnir fyri eftirfylgjandi sáttmálarnar vórðu broyttir munandi, lønarhækkanin varð latin í prosentum soleiðis:

- Tann 1. oktober 2022 hækkaðu lønirnar 3,8 %
- Tann 1. oktober 2023 hækkaðu lønirnar 4,04 % (seinni 4,2 %)
- Tann 1. oktober 2024 hækka lønirnar 4,75 %

Tíðarskeiðini fyri nær lønarhækkanirnar eru galdandi frá og til eru ymisk fyri einstøku sáttmálarnar.

Fyri heilsurøktararnar eru omanfyrinevndu lønarhækkanir galdandi frá at sáttmáli teirra gekk út í oktober 2022, meðan somu lønarhækkingarnar fáa gildi fyri ávikavist handverkarar frá 1. januar 2023, og fyri námsfrøðingar og hjálparfólk á dagstovnaøkinum frá 1. apríl 2023, alt í mun til frammanundan avtalaða sáttmálaskeiðið.

Umframt Heilsurøktarafelagið hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið gjørt sáttmála við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag handverkaranna, Danska Tannlæknafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Sáttmálasamráðingarnar fyri 2023 halda fram við Føroya Pedagogfelag og Maskinmeistarafelagið.

### SAMSÝNINGAR TIL KOMMUNUSTÝRISLIMIR

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið arbeiðir á fleiri mótum og við fleiri ymiskum viðurskiftum. Vit arbeiða við átøkum, sum vit avtala í sáttmála við fakfeløg, sum virka á kommunala sáttmálaøkinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið luttekur í netverkum og arbeiðsbólkum av ymiskum slagi.

Eitt av evnunum, sum vit hava lagt okkum eftir at lýsa í 2023 er samsýningin til kommunustýrislimir, harundir samsýningin til borgarstjórar.

Seinnu árini hava serliga borgarstjórar í størru kommununum gjørt vart við, at samsýningin ikki stendur mát við arbeiðsbyrðuna, sum liggur í arbeiðinum hjá borg-

arstjóranum. Mett er eisini, at samsýningin ikki stendur mát við lønarlagið í samfelagnum í dag – og eigur at verða tillagað.

Samsýningin til borgarstjórar er ikki dagførd síðani 2006, meðan samsýningin hjá landsstýrisfólkum javnan verða viðgjørd.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur gjørt upprit um samsýningina til kommunustýrislimir.

Greiða fatanin hjá felagnum er, at kunngerðin um samsýningar til kommunustýri eigur at verða dagførd.

# Barnaverndarstova Føroya

Talið av barnaverndarmálum í 2023 var 949. Hetta er eitt heldur størri tal enn undanfarnu árini, tó at tað ikki víkir heilt av leið frá teimum seinastu. Barnaverdarstovan fær ikki víst á einstakar frágreiðingar til hækkingina.

### BARNAHÚSIÐ 10 ÁR

Barnaverndarstovan samskipar Barnahúsið, sum er tvørgeiraligt samstarv millum avvarðandi myndugleikar í málum um ágang á børn, tá tørvur er á tí. Í Barnahúsinum savnast umboð fyri kommunu, tað vil siga barnaverndartænasta, umframt løgreglu og sjúkrahúsverk fyri at samskipa arbeiðið um barnið. Endamálið er, at barnið fær røttu hjálp og rættan stuðul í barnavinarligum kørmum.

Um ólavsøkumundið flutti Barnahúsið í onnur høli, eftir at fyrrverandi hølini skuldu takast niður. Arbeitt hevði verið við ymsum loysnum, millum annað at útbyggja annað av húsunum hjá Kommunufelagnum til eisini at fevna um Barnahús. Niðurstøðan gjørdist at flyta í onnur høli, sum hava á leið somu hentleikar og stand sum tey fyrru.

Í 2023 vórðu 53 nýggj barnahúsmál stovnað. Hetta eru fleiri enn dupult som mong í mun til 2022 og nógv tað størsta talið í 10 ára søguni hjá Barnahúsinum. Miðaltalið er 32 mál um árið, og talið á málum hevur annars sveiggjað úr 20 upp í 39 mál. Út frá tølunum á málum ber ikki til at greiða frá, hví tølini eru, sum tey eru. Orsakirnar kunnu vera fleiri. Ein orsøk kann vera, at tað í 2023 vóru fleiri mál, har illtonktu gingu aftur í fleiri málum. Eisini kann nevnast, at tað í farna ári vóru lutfalsliga nógv mál, sum snúðu seg um lokking á netinum (grooming).

### BARNAVERKÆTLANIN

Frá á sumri 2023 hevur Barnaverndarstovan tikið lut í barnaverkætlanini, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur koyrt av bakkastokki. Talan er um víðfevnda og framsøkna verkætlan, og vit kýta okkum við íkasti til, at røkkast kann á mál.

### BØRN VIÐ ÚTLENDSKUM UPPRUNA

Seinnu árini er talið á fólki við útlendskum uppruna vaksið í Føroyum. Her verður hugsað um fólk úr øðrum londum enn Norðurlondum. Í barnaverndarmálum síggjast eisini børn við útlendskum uppruna. Seinastu trý árini hava barnaverndartænasturnar tískil talt saman barnaverndarmál við børnum, har annað ella bæði foreldrini hava útlendska bakgrund, har ríkisborgarar úr Danmark, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Finnlandi ikki telja við. Tølini vísa greitt, at talið á málum við útlendskum børnum er yvirumboðað samanborið við føroysk. Tað vil siga, at talið av barnaverndarmálum við útlendskum børnum í mun til talið av útlendskum børnum í Føroyum er munandi størri enn talið av barnaverndarmálum við føroyskum børnum í mun til talið av føroyskum børnum. Her skal dentur leggjast á, at tølini annars ikki eru granskað, tá tað ræður um álvarsemi ella slag av málum.

Eins og málini við upprunaføroyskum børnum eru ymisk í álvarsemi, er tað sama galdandi fyri børn við útlendskum uppruna. Men barnaverndartænasturnar vísa á, at málini við útlendskum børnum hava tað til felags, at tey eru trupul at handfara vegna forðingar orsakað av málsligum- og mentanarligum muni. Barnaverndartænasturnar vísa á, at partur av frágreiðingini helst er manglandi skipað integratión av tilflytarunum. Harumframt eru starvsfólk í barnaverndartænastunum ikki útbúgvin at handfara viðskiftafólk við øðrvísi mentanum og fremmandum máli. Føroyar mugu taka sín part í altjóðasamfelagnum. Men skipanir mugu gerast til tess at lofta hesum.

### BARNAVERND UTTAN FAMILJUDEPIL ÁR UM ÁR ...

Manglandi familjudepilin hevur nú á triðja ári merkt virksemi okkara. At tað ikki ber til at vísa familjur til familjudepil er ein órímiligur meinbogi, ið ger føroyska barnaverndararbeiðið ófullfíggjað. Í fyrra lagi er avleiðingin, at barnaverndartænastunum vantar amboð til neyvar eygleiðingar av foreldraførleika. Í seinna lagi hevur manglandi familjudepilin við sær, at foreldrini ikki fáa møguleikan at búnast sum foreldur, samstundis sum tey verða eygleidd. Hetta merkir, at neyðugt verður at gera fleiri foreldraførleikakanningar av sálarfrøðingum, ið hevur við sær munandi eyka útreiðslur. Sostatt kann bæði vera orsøk at síggja fyri sær umsorganaryvirtøkur, ið sloppið kundi verið undan, og at børn í summum førum verða verandi í heimum, har tað møguliga var fyri barnanna besta, at tey vórðu sett heiman

### NÝGGJAR LÓGIR – STÓRIR BATAR

Við virknaði frá 1. januar 2024 samtykti løgtingið at veitast skal sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsrakt børn, íroknað børn, sum flyta á Kreppumiðstøðina saman við mammuni. Barnahúsið hevur fingið hesa nýggju uppgávu, og vit leggja drúgva orku í at snikka eitt haldgott sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsraktu børnini, sum eru fevnd av tí. Vit fegnast mikið um hendan týðandi bata, sum vit eru sannførd um fer at hjálpa børnunum í støðuni við harðskapi og at fyribyrgja langtíðarárin av harðskapinum.

Í øðrum lagi samtykti løgtingið í desember 2023 einmælt at broyta revsilógina um kynsliga avnoyðslu og lokking. Hetta hevur við sær, at lokking og kynslig avnoyðsla eru vorðin kynslig brotsverk í Føroyum, eins og tey eru í nógvum øðrum londum. Áðrenn lógarbroytingina var torført hjá ákæruvaldinum at lyfta próvbyrðuna í sambandi við lokking og avnoyðslu.

Sjálvandi ber ikki til at løggeva seg burtur úr, at kynsligur ágangur so sum lokking kemur fyri. Men lógarbroytingin er eitt týðandi fet rætta vegin til betri verju av børnum og ungum fyri kynsligum ágangi. Barnaverndarstovan metir tað rættiliga sannlíkt, at nýggja lógin fer at hava við sær fleiri barnaverndar- og barnahúsmál framyvir.

### ÆTLANIR UM BETRI UMSTØÐUR HJÁ FOSTURFAMILJUM

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at ætlanir eru um at betra umstøðurnar hjá fosturfamiljum, millum annað við at geva møguleika fyri sokallaðum styrktum og spesialiseraðum fosturforeldrum. Endamálið er lata upp fyri, at fleiri børn kunnu vera í fosturheimum í staðin fyri á barnaverndarstovnum. Hesum ætlanum heilsa vit vælkomnum, og vóna inniliga at síggja gjørligar og ítøkiligar ætlanir fyrsta dagin. Hetta fer millum annað at krevja førleikamenning av fosturforeldrunum og tørv á størri starvsfólkatilfeingi hjá Barnaverndarstovuni/Fosturforeldraskipanini – við øðrum orðum meirútreiðslur, sum kommunur og land mugu samráðast um fíggingarleist til.

**Barnaverndarmál við ársenda**




Hendingar í árinum

## Frítíðarskúlatilboð til barn við serligum tørvi

Foreldrini at einum barni við serligum tørvi vendu sær til kommununa um tilboð til barnið, tá ið skúlin var stongdur. Foreldrini vístu á, at frítíðarskúlin var stongdur, tá ið fólkaskúlin var stongdur. Hetta var ein avbjóðing fyri familjuna, tí barnið sambært foreldrunum ikki kundi vera einsamalt heilar dagar, meðan foreldrini vóru til arbeiðis.

Kommunan vendi sær til skrivstovuna við fyrispurningi, um hetta barnið hevði krav upp á at fáa frítíðartilboð, tá ið skúlin var stongdur. Kommunan upplýsti í hesum sambandi, at frítíðarskúlin var stongdur fyri øllum børnum samstundis.

Skrivstovan upplýsti, at frítíðarskúlatilboð verða skipað eftir dagstovnalógini. Sambært lógini hava børn við serligum tørvi (við heilt fáum undantøkum) rætt til tilboð á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi. Tó er onki krav um, at børn við serligum tørvi skulu hava eitt víðkað tilboð – soleiðis at skilja, at tað skal vera opið, tá ið tað er stongt fyri øðrum børnum.

Í tíðarskeiðum, har einki kommunalt tilboð er um frítíðarskúla, má familjan sostatt venda sær til Almannaverkið. Og málið kemur tá undir reglur og raðfesting hjá Almannaverkinum.






## SSP-ráðgevingin

SSP-ráðgevingin virkar fyri at samskipa SSP-arbeiðið kring landið og veita ráðgeving til økisbólkarnar í SSP-samstarvinum. Økisbólkarnir eru skipaðir í teimum átta barnaverndarøkjunum við umboðum frá barnaverndartænastum, skúlum, politii, frítíðarskúlum, ungdómshúsum og øðrum, ið møtast regluliga við einum felags endamáli: At tryggja trivnað millum børn og ung við at raðfesta fyribyrgjandi arbeiði og harvið minka um vandafaktorar.

Eins og øll hini árini, síðani SSP-samstarvið varð stovnað í 2008, hevur stórur eftirspurningur verið eftir fyribyrging, bæði politiskt og kommunalt.

SSP leggur stóra áherðslu á týdningin av góðum og tøttum foreldrasamstarvi, umframt at ferðast trygt á netinum við ymiskum átøkum.

Farna árið hevur SSP-ráðgevingin arbeitt nógv við trivnaði og fyribyrging innan bæði talgilda heimin og rúsevnisnýtslu. Barnaverkætlanin, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið skipar, hevur verið partur av virkseminum, har SSP hevur givið sítt íkast.

Verkstovur og foreldrafundir hava serliga verið við skúlabyrjan og í hádeild við denti á tøttum foreldrasamstarvi. Løtumyndakanningar verða gjørdar í einstøku flokkunum, har foreldur fáa innlit í verandi støðu. "Øll hini sleppa" er verkstovan í hádeild, har endamálið millum annað er at útseta byrjanaraldurin fyri rúsdrekka- og nikotinnýtslu umframt trivnað í flokkinum. Hetta eru faktorar, ið hava týdning fyri rúsevnisfyribyrging.

Tryggari Internetdagur er átakið, har arbeitt verður við ársins evni og endar við eini kapping, har verkætlanaravrikið verður latið inn. Endamálið er, at ung læra at ferðast trygt á netinum. Í ár var evnið Talgildur harðskapur við undirevnunum tráelting, lokking og scamming. Fyri fyrstu ferð vóru heili tríggir evnisdagar, og luttøkan gjørdist metstór. Eisini bleiv www.tid.fo stovnað, og treytirnar fyri kappingina vórðu broyttar til eitt talgilt avrik.

Nógv orka er løgd í at gera virksemið hjá SSP sjónligt við upplýsing og vitanardeilan til almenningin og fakfólk.

Ráðstevnan, Kveikingardagurin, varð hildin 1. februar við høvuðsevninum, foreldur og familjan. Metstóra luttøkan og góðu afturboðanirnar vísa á tørvin á einum degi, har fakfólk innan barna- og ungdómsøkið kunnu savnast, fáa íblástur og styrkja samstarvið tvørtur um geirar. SSP leggur seg altíð eftir at styrkja verndarfaktorar fyri at minka um vandafaktorar.

Tørvur er áhaldandi á førleikamenning og nýggjastu vitan, tá tað kemur til ymisk rák, sum ávirka børn og ung. Tí luttaka fleiri innan SSP-samstarvið á árligu SSP-ráðstevnuni í Danmark, har evnið í 2024 er Forebyggelse i forandring - Mosaikker i et SSP-perspektiv. Ráðstevnan viðvirkar til, at vit eru før fyri at handfara rák, sum oftast síggjast aftur í Føroyum.

## Listaleypurin

Listaleypurin, sum er partur av virkseminum í Kommunufelagnum hevur nú virkað í 16 ár. Listleypurin er ein mentanarlig verkætlan, sum Kommunufelagið, Uttanríkis- og mentamálaráðið og Norðurlandahúsið fíggja og fyriskipa í samstarvi við LISA (Listafólkasamband Føroya) til tess at geva fólkaskúlanæmingum høvi at uppliva yrkislist innan skúlagátt.

Listaleypurin ber list út í skúlar í Føroyum fyri at kveikja forvitnið hjá næmingunum og teirra vitan og fatan fyri listarligum arbeiði. Samstarvspartarnir bjóða við hesi samstarvsavtalu skúlum fjølbroytt listar- og mentanarlig átøk, og virka soleiðis fyri at menna arbeiðið, sum verður gjørt fyri at stimbra áhugan og menna førleikan hjá børnum og ungum innan listarligt virksemi.

Listaleypurin er hvørt ár fyltur við hópin av spennandi framførslum, dagsverkstovum og longri verkstovum, sum skúlarnir kunnu velja ímillum. Skúlarnir hava hvørt ár 12-18 listarlig tilboð at velja ímillum.

Dentur verður lagdur á at røkka ymsum aldursbólkum og at spjaða listaleypavitjanirnar um alt landið. Øll tilboð í Listaleypinum eru ókeypis hjá skúlum í teimum kommunum, sum luttaka í Listaleypinum.



## Talgilda HeilsuSkipanin

Verkætlanin, Talgilda HeilsuSkipanin til kommunalu heilsutænasturnar, nærkast nú endanum. Tá 2024 er komið at enda, eru allar kommunalu heilsutænasturnar verksettar og kunnu trygt skriva talgilda journal og samskifta við kommunulækna, Sjúkrahúsverkið og Apoteksverkið í talgildu skipanini.

Talgilda HeilsuSkipanin fevnir um sjúklingajournal fyri allar borgarar í Føroyum. Kommunalu heilsutænasturnar fevna um allar viðgerðir og veitingar í kommunalu bú- og heimatænastunum.

Í 2023 var landslæknaeftirlit á fleiri bústovnum, og hetta hevur gagnað verkætlanini. Landslæknaeftirlitið staðfesti, at dygdarmennarar hjá Heilsu- og umsorganartænastuni í Tórshavn, Norðoya Bú- og Heimatænastu og Roðanum, hava gjørt eitt serstakliga gott arbeiði fyri, at journalin er greið og løtt at lesa. Journaluppsetingin vísir altíð aktuellu støðuna hjá borgaranum, og hvørja viðgerð borgarin fær frá kommunalu heilsutænastunum. Harvið hava øll starvsfólk uttan mun til fak og tíð eina greiða mynd av borgaranum.

Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavn, Norðoya Bú- og Heimatænasta og Roðin eru pilotøki í verkætlanini. Teirra starvsfólk standa á odda fyri uppseting, test, at lýsa skjalfestingarháttt, arbeiðsgongdir, frálæru og fyri verkseting. Hetta er eitt rimmar arbeiði við fleiri ársverkum.

Hesar tríggjar kommunalu heilsutænasturnar fara at handa Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy, VEKS, Vesturvón, Nánd og Økistænastuni í Sandoy eina lidna uppseting við talgildum frálærutilfari og arbeiðsgongdum. Hetta verður gott grundarlag fyri teirra verkseting.

Nógvar avbjóðingar hava verið í at skipa samskiftisrásir fyri ambulatoriunum í Sjúkrahúsverkinum til kommunalu heilsutænasturnar. Hetta hevur nýliga fingið sítt pláss í talgildu skipanini. So við og við eru starvsfólk vorðin alt meira tilvitað um, at kommunalu heilsutænasturnar eru um borgaran dagliga og veita áhaldandi viðgerð og røkt, aftaná at borgarin fer av sjúkrahúsinum.

Kommunalu heilsutænasturnar varða millum annað av borgarum við kompleksum sjúkum. Fleiri av hesum borgarunum fáa ikki sjálv greitt frá síni sjúkusøgu ella endurgivið frá eini læknavitjan.

Heimasjúkrarøktin møtir nýggjum sjúklingum hvønn dag, og hesir kunnu vera í øllum aldri.

Eitt av málunum við verkætlanini er at hava talgildar heilivágslistar. Hetta skal tryggja, at Sjúkrahúsverkið, kommunalu heilsutænasturnar og kommunulækni hava sama dagførda lista av heiliváginum hjá borgaranum. Hetta hevur eydnast at talgilda hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu og hjá Roðanum. Tað hevur ikki eydnast hjá Heilsu- og umsorganartænastuni í Tórshavn. Orsøkin er, at neyðugt er at læknar dagføra, aktivera og seta tíðir á heilivágin. Tað hevur ikki borið til at fáa hetta samstarv í lag við allar kommunulæknar í høvuðsstaðarøkinum. Tað ber ikki til at verkseta nakrar heilivágslistar talgilt og at hava aðrar á pappíri. Tískil er neyðugt hjá Heilsu- og umsorganartænastuni í Tórshavn at brúka pappírslistar.

Eitt av málunum fyri 2023 var at verkseta bústovnarnar í pilotøkjunum. Norðoya Bú- og Heimatænasta og Roðin verksettu sínar bústovnar frá februar til juni. Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavn verksetti frá februar til november.

Samstundis var arbeitt við fyrireiking av verkseting av heimatænastunum. Hendan verkseting fór av bakkastokki fyrst 2024. Í mars 2024 vóru Norðoya Bú- og Heimatænasta og Roðin verksett, meðan Heilsu- og umsorganartænastan verksetur frá apríl til november 2024.

Nú nærkast vit at røkka politisku hugsjónini, at alt heilsuøkið hevur felags skrásetingarskipan við felags minni.

Hendingar í árinum

# Ampi av royki frá grannum

Ein kommunustýrislimur hevði fingið fleiri klagur frá borgarum, sum kærdu sína neyð um ampa av royki frá grannum, sum kyndu upp. Fyrispurningurin snúði seg í stuttum um, hvørjar heimildir kommunan hevði á hesum øki, herundir um kommunan kundi seta reglur í verk fyri slíkt.

Skrivstovan vísti á, at kunngerð um umhvørvisreglur (nr. 53/1994) hevur ávísar reglur um hesi viðurskifti. Í § 6 er sostatt ásett, at "elvir oljufýrur, ovnur ella tílíkt til royk, dust, óljóð ella aðrar ampar fyri fólk, ið búgva nærindis, kann bý- ella bygda(r)ráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum." Sama kunngerð inniheldur reglur um, hvussu farast skal fram, um boðini ikki verða fylgd.

Við heimild í § 6 kann kommunan sostatt geva boð um at seta tiltøk í verk fyri at fyribyrgja t.d. tí ampa, ið stendst av fýringsútbúnaði. Verða boðini ikki fylgd, kann málið meldast til løgregluna, sum síðani yvirtekur málið.

Víst varð á, at tá ið slík boð verða givin, er talan er um eina fyrisitingarliga avgerð, sum kann kærast. Kæran hevur í útgangsstøði steðgandi virknað, men um serligar orsøkir eru til tess, kann kommunan gera av, at boðini skulu fylgjast uttan mun til kæru. Hugsandi kann ampi av royki v.m. koma undir hesa áseting vísandi til, at slíkt kann vera bæði heilsu- og umhvørvisskaðiligt.

Skrivstovan hevði ikki kunnleika til nakra heimild at áseta nærri reglur um, hvussu fýringsútbúnaður meiri generelt skal nýtast. Kommunan kundi tó umhugsað at gera vegleiðing um, hvat havast skal í huga, tá ið kynt verður upp. Víst varð á, at íblástur kann kanska finnast hjá øðrum kommunum við møguligum ískoyti frá viðkomandi vegleiðingum um líknandi viðurskifti. Í vegleiðing síni kundi kommunan eisini gjørt vart við heimildirnar í omanfyrinevndu kunngerð.

Hendingar í árinum

## Hvussu leingi er eitt tilboð galdandi?

Ein borgari vendi sær til kommununa við ynski um, at kommunan keypti aftur eitt stykki. Hetta var grundað á eitt fýra ára gamalt skriv frá kommununi, sum borgarin metti sum eitt tilboð til sín.

Kommunan ynskti ikki at keypa grundstykkið aftur, men var sinnað at lata eina treytaða víðarisøluváttan, so borgarin kundi selja stykkið privat. Kommunan var tó ivasom um, hvørt fýra ára gamla skrivið álegði kommununi eina skyldu at keypa stykkið, og bað tí skrivstovuna um vegleiðing um, hvussu hon skuldi meta um málið.

Skrivstovan upplýsti, at varð skrivið mett sum eitt tilboð, so hevur tað týdning, um tikið er av tilboðnum ella ikki. Hetta var higartil ikki gjørt.

Tilboð eru annars bindandi fyri tilboðsgevara, men kunnu fella burtur, um ikki tikið verður av rættstundis. Hetta er eisini galdandi fyri tilboð, sum hava eitt óvist/tvítýtt innihald.

Er ongin freist sett fyri at taka av tilboðnum, verður tað ein ítøkilig meting, nær tilboðsmóttakarin ikki longur kann taka av tilboðnum.

Í hesum føri vóru gingin fýra ár, uttan at viðkomandi hevði tikið av. Hetta talaði í sær sjálvum fyri, at tilboðið ikki var galdandi longur. Samstundis liggur ein spekulatiónsmøguleiki hjá tilboðsmóttakara í at bíða við at taka av (prísurin hækkar við tíðini). Somuleiðis eru vanligu accept-freistirnar í sambandi við keyp av fastogn ofta lutfalsliga stuttar – frá nøkrum døgum upp í fáar vikur. Og eisini eru rímiliga stór virði uppá spæl. Alt hetta talaði fyri, at umhugsanartíðin hjá tilboðsmóttakaranum var farin.

Skrivstovan metti tí, at viðkomandi ikki longur kundi taka av tilboðnum. Harvið var tað heldur ikki nakað til hinders fyri, at kommunan svaraði umbønini á sama hátt, sum kommunan vanliga ger við at bjóða viðkomandi eina treytaða víðarisøluváttan.

Skrivstovan mælti at enda kommununi til altíð at seta greiðar og rímiligar freistir fyri tey tilboð, sum kommunan gevur.

# 9. At enda

Sum áður nevnt verður kommunuval annan týsdag í november. Á seinasta kommunuvali, sum var 10. november 2020, vóru meira enn helmingurin, ella umleið 55 %, av øllum kommunustýrislimunum nývaldir. Um útskiftingin verður líka stór hesa ferð, vita vit av góðum grundum ikki fyrr enn týskvøldið tann 12. november, tá ið veljarar kring landið hava talað.

Skrivstova felagsins fer nú undir at fyrireika tað skeiðsvirksemið, sum altíð er fyrst í árinum, tá ið nýggju kommunustýrini taka við. Hvussu hetta ítøkiliga verður skipað, verður kunnað um seinni í ár.

Enn einaferð skal eg takka tykkum øllum fyri góða samstarvið hesi fýra árini, ið mær var givið at sita í formansskapinum hjá Kommunufelagnum. Takk fyri álitið, og takk fyri mangar gevandi og eisini stuttligar politiskar fundir, vit hava havt hesi árini. Onkuntíð hevur tað verið krevjandi, men vit finna nærum altíð semjurnar í Kommunufelagnum, tí umframt at vera ein verjusamgonga, er felagið kanska mest av øllum eitt konsensus-felag, har semjur eru neyðugar.

Takk fyri og framhaldandi góðan aðalfund!



# 10. Kommunubúskapurin 2023

## Gongdin í fólkatalinum

Vøksturin í fólkatalinum, sum byrjaði í 2013, helt fram í 2023, og við ársenda 2023 búðu omanfyri 54.500 fólk í Føroyum. Hetta eru 440 fleiri enn við ársbyrjan, og ein vøkstur á 0,8 %.

Vøksturin seinnu árini hevur verið rættiliga ójavnt býttur millum kommunurnar, og soleiðis var eisini í 2023. Eins og undanfarin ár er mesti vøksturin í miðstaðarøkinum. Størsti vøksturin er í kommununum rundan um Skálafjørðin – ivaleyst eitt úrslit av Eysturoyartunlinum.

**Fólkatalið í kommununum við ársbyrjan og ársenda í 2023**

| Kommuna | 1. januar 2023 | 1. januar 2024 | Vøkstur | Vøkstur % |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 22.982 | 23.231 | 249 | 1,1% |
| Klaksvíkar kommuna | 5.417 | 5.478 | 61 | 1,1% |
| Runavíkar kommuna | 4.326 | 4.376 | 50 | 1,2% |
| Eysturkommuna | 2.255 | 2.294 | 39 | 1,7% |
| Vága kommuna | 2.184 | 2.199 | 15 | 0,7% |
| Sunda kommuna | 1.828 | 1.825 | -3 | -0,2% |
| Tvøroyrar kommuna | 1.762 | 1.748 | -14 | -0,8% |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.619 | 1.633 | 14 | 0,9% |
| Nes kommuna | 1.500 | 1.536 | 36 | 2,4% |
| Vágs kommuna | 1.361 | 1.366 | 5 | 0,4% |
| Vestmanna kommuna | 1.263 | 1.270 | 7 | 0,6% |
| Sørvágs kommuna | 1.242 | 1.232 | -10 | -0,8% |
| Sjóvar kommuna | 1.191 | 1.206 | 15 | 1,3% |
| Eiðis kommuna | 803 | 805 | 2 | 0,2% |
| Hvalbiar kommuna | 666 | 640 | -26 | -3,9% |
| Kvívíkar kommuna | 606 | 599 | -7 | -1,2% |
| Sands kommuna | 522 | 529 | 7 | 1,3% |
| Skopunar kommuna | 469 | 471 | 2 | 0,4% |
| Hvannasunds kommuna | 425 | 426 | 1 | 0,2% |
| Viðareiðis kommuna | 348 | 344 | -4 | -1,1% |
| Sumbiar kommuna | 343 | 335 | -8 | -2,3% |
| Porkeris kommuna | 331 | 322 | -9 | -2,7% |
| Kunoyar kommuna | 150 | 154 | 4 | 2,7% |
| Skálavíkar kommuna | 128 | 142 | 14 | 10,9% |
| Hovs kommuna | 104 | 106 | 2 | 1,9% |
| Húsavíkar kommuna | 102 | 102 | 0 | 0,0% |
| Fámjins kommuna | 79 | 80 | 1 | 1,3% |
| Fugloyar kommuna | 43 | 42 | -1 | -2,3% |
| Skúvoyar kommuna | 34 | 32 | -2 | -5,9% |
| **Alt landið** | **54.083** | **54.523** | **440** | **0,8%** |




# Kommunubúskapurin

Roknskapirnir hjá kommununum fyri 2023 eru ikki endaliga uppgjørdir enn, men mett verður, at rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum vóru samanlagt 2.565 mió. kr. í 2023. Inntøkurnar vóru 3.207 mió. kr., og tað hevur við sær, at rakstrarúrslitið fyri allar kommunur samanlagt var umleið 642 mió. kr. í 2023.

Íløgurnar verða mettar til 785 mió. kr. í 2023, og tað ber við sær, at samlaða úrslitið fyri allar kommunur samanlagt verður eitt hall á umleið 143 mió. kr. í 2023. Hetta er sætta árið á rað, at hall er samanlagt í kommunala geiranum. Í 2021 var hallið 75 mió. kr., og í 2022 var tað 33 mió. kr.

Tað eru tær søguliga stóru íløgurnar, ið eru orsøk til, at hall hevur verið seinastu seks árini. Verður einans hugt at sjálvum rakstrinum, so er talan um eitt hampiligt rakstraravlop, sum er eitt sindur størri enn árligu íløgurnar vanliga eiga at vera. Roknað verður við einum meira vanligum støði á íløgunum komandi árini, og so verður væntandi aftur avlop í kommunala geiranum.

### INNTØKUR

Samlaðu inntøkurnar hjá kommununum vóru 3.207 mió. kr. í 2023.

Størsti parturin av inntøkunum hjá kommununum stava frá kommunuskatti. Í 2023 var talan um 2.381 mió. kr., og tað er umleið 3/4 av samlaðu inntøkunum.

Inntøkurnar frá skatti av inngjøldum til eftirløn hava, síðan eldraøkið var lagt út í 2015, verið ein munandi og vaksandi partur av kommunalu inntøkunum. Í fjør gjørdist talan um 514 mió. kr. Restin av inntøkunum stavar frá felagsskattinum, sum var 208 mió. kr., og afturbering fyri serskipanir, sum var 104 mió. kr.

Inntøkurnar vuksu við 184 mió. kr. samanlagt í 2023, og tað samsvarar við 6,1 %. Tað má sigast at vera ein sera góður vøkstur. Hetta er tó eitt vet minni enn í fjør, tá inntøkurnar vuksu heili 7,5 %.

**Úrslit samanlagt fyri allar kommunur**

| Mió. kr. | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Rakstur | 2.240 | 2.351 | 2.565 |
| Inntøkur | 2.811 | 3.023 | 3.207 |
| **Rakstrarúrslit** | **571** | **672** | **642** |
| Íløgur | 646 | 706 | 785 |
| **Samlað úrslit** | **-75** | **-33** | **-143** |

**Inntøkurnar hjá kommununum í 2023**

| Mió. kr. | 2022 | 2023 | Vøkstur mió. | Vøkstur % |
|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 2.247 | 2.381 | 134 | 6,0% |
| Felagsskattur | 196 | 208 | 12 | 5,9% |
| Eftirlønarskattur | 475 | 514 | 39 | 8,1% |
| Afturbering | 104 | 104 | 0 | -0,1% |
| **Tilsamans** | **3.023** | **3.207** | **184** | **6,1%** |

KOMMUNUSKATTUR
Kommunuskattur verður rindaður av skattskyldugu inntøkuni omanfyri botnfrádráttin á 30 tús. kr. Botnfrádráttin, ið er ásettur í skattalógini, hevur verið óbroyttur síðan 2008. Frá útroknaða skattinum verður drigin ein barnafrádráttur, ið kommunustýrið sjálvt ásetur.

Kommunuskattaprosentini hava sum heild verið lækkandi seinastu árini, og barnafrádrátturin hevur sum heild verið hækkandi.

Grundarlagið undir kommunuskattinum er rættiliga ymiskt kring landið. Tað, sum serliga kann minka um grundarlagið undir kommunuskattinum er, um nógvir pensjónistar búgva í kommununi, tí fólka- og fyritíðarpensjón eru næstan skattafríar. Men eisini hevur tað stóra ávirkan, um nógv arbeiða uttanlands ella eru undir serskipanum sum FAS og DIS.

FELAGSSKATTUR
Sambært § 5 í ásetingarlógini fellur 70 % av felagsskattinum til landið og 30 % til kommunurnar. Skatturin fellur ymiskt, alt eftir hvar í landinum feløg eru heimahoyrandi. Tó rinda peningastovnar, tryggingarfyritøkur, telesamskiftisfyritøkur, oljusølufyritøkur og vinnurekandi grunnar skatt til allar kommunur.

Tað er sera ymiskt, hvussu felagsskatturin hilnast hjá kommununum. Seinastu árini hava serliga tær kommunur, har alivirksemi er, og har uppsjóvarfeløg eru heimahoyrandi, fingið væl av inntøku.

SKATTUR AV EFTIRLØNARINNGJØLDUM
Sambært § 12, stk. 1, í eftirlønarlógini fellur skatturin av inngjøldum til pensjón til kommunurnar eftir talinum av persónum 67 ár ella eldri. Tó so, at talið av borgarum 67 ár ella eldri í Sandoy verður hækkað við 30 %.

Skatturin fellur serliga til tær kommunur, har nógv eldri búgva, og tað eru yvirhøvur kommunur í Suðuroy og Sandoy.

AFTURBERING VEGNA DIS, FAS OG FRÁDRÁTTIR
Í sambandi við at kommunurnar yvirtóku eldraøkið 1. januar 2015 var ásett í løgtingslóg nr. 136 frá 19. desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir, at kommunurnar árliga fáa eina upphædd, ið samsvarar við 19,1 % av:

- DIS-inntøku
- FAS-inntøku
- Fiskimannafrádráttinum (§ 25a)
- Uttanlandsfrádráttinum (§ 25b)

Endurgjaldið verður latið kommunum eftir bústaði hjá viðkomandi skattgjaldara.

RAKSTRARÚTREIÐSLUR
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum verða mettar til 2.565 mió. kr. í 2023. Mestu rakstrarútreiðslurnar eru innan eldraøkið og barnaansing. Rakstrarútreiðslurnar á eldraøkinum vóru 640 mió. kr. í 2023, hetta er ein fjórðingur av samlaða rakstrinum. Barnaansingin stendur fyri umleið einum fimtingi av rakstrinum, og fyrisiting og fólkaskúlin fyri ávikavist 9 % og 7 %.

ÍLØGUR
Kommunalu íløgurnar vóru 785 mió. kr. í 2023. Umleið ein triðingur fór til virksemisøkið, vegir og havnir, og her eru tað serliga innkomuvegurin í Havn og Fjøruvegurin í Runavík, sum telja nógv. Ein annar triðingur fór til økið, ítróttur. Her eru tað serliga svimjihallirnar í Havn og Runavík, sum gera mun.

FÍGGJARSTØÐAN
Mett verður, at samlaða nettoskuldin hjá kommununum var umleið 1 mia. kr. við ársenda í 2023. Tá nettoskuldin verður gjørd upp, verða tøkur peningur og onnur fíggjarlig áogn drigin frá bruttoskuldini.

Kommunala skuldin var í nógv ár í minking. Men skuldin er støðugt økt seinastu árini, nú hall hava verið í seks ár á rað. Í 2017 var samlaða nettoskuldin einans 139 mió. kr.

Hendingar í árinum

## Rokningar frá 2015 skuldu ikki gjaldast

Ein fyritøka hevði gjøgnumgingið sítt bókhald og metti seg hava ógoldin krøv mótvegis einari kommunu. Krøvini vóru fyri arbeiði ella veiting, sum var liðugt átta ár frammanundan.

Kommunan hevði kannað sína bókhaldsskipan og fann ongar rokningar frá fyritøkuni, sum ikki vóru goldnar. Kommunan ivaðist eisini í, hvørt hon var skyldug at gjalda rokningar, sum vóru so gamlar. Ítøkiliga vildi kommunan vita, um hon var á rættari leið, tá ið hon metti slík krøv vera fevnd av 5-ára fyrningarregluni.

Skrivstovan var samd í metingini hjá kommununi um, at hesi møguligu krøv í útgangsstøðinum vóru fyrnað og skuldu ikki gjaldast. Skrivstovan upplýsti harumframt, at tað vanliga eisini verður sagt, at tað er upp til tann, sum kemur við einum kravi, at vísa á, hví kravið kann gerast galdandi. Í einum føri sum hesum metti skrivstovan onki vera til hindurs fyri at vísa á, at sjálvt um her skuldi verið eitt krav móti kommununi, so tyktist tað vera fyrnað – og at fyritøkan tí mátti vísa á, hví tey hildu seg kunna gera kravið galdandi.

**Samlaðar rakstrarútreiðslur hjá kommunum í 2023**

| Mió. kr. | 2023 | %-býtið |
|---|---|---|
| Eldraøkið | 640 | 25% |
| Barnaansing | 535 | 21% |
| Fyrisiting | 235 | 9% |
| Fólkaskúlin | 170 | 7% |
| Annað | 985 | 38% |
| **Tilsamans** | **2.565** | **100%** |

**Samlaðar íløgur hjá kommunum í 2023 eftir virksemisøki**

| Mió. kr. | 2023 | %-býtið |
|---|---|---|
| Vegir og havnir | 274 | 35% |
| Ítróttur | 256 | 33% |
| Annað | 255 | 32% |
| **Tilsamans** | **785** | **100%** |

# Kommunurnar fáa nú part av tøkugjaldinum og veiðigjøldunum

Sitandi landsstýri hevur gjørt broytingar bæði í tøkugjaldinum hjá alivinnuni og veiðigjøldunum í fiskivinnuni. Í hesum sambandi setti landsstýrið sær fyri, at kommunurnar skuldu haldast fíggjarliga skaðaleysar vegna broytingarnar.

Tað er soleiðis, at tá hesi gjøld hækka, missa kommunurnar inntøkur, tí inntøkurnar frá partafelagsskatti verða minni enn annars. Kommunurnar fáa 30 % av partafelagsskattinum.

Undanfarin landsstýri hava ikki latið kommununum nakað endurgjald, tá hesi gjøld eru hækkað, tí var tað merkisvert, at landsstýrið valdi at lata kommununum endurgjald fyri hækkingina av gjøldunum.

Broytingarnar hava við sær, at kommunurnar frá 1. januar 2024 fáa 2 % av samlaða tøkugjaldinum, sum alivinnan rindar og somuleiðis eisini 2 % av samlaðu veiðigjøldunum, sum fiskivinnan rindar. Roknað verður við, at kommunurnar fáa samanlagt góðar 16 mió. kr. í 2024. Harav stava góðar 7 mió. kr. frá alivinnuni og góðar 9 mió. kr. frá fiskivinnuni.

Inntøkurnar frá veiðigjaldinum fella til ta kommunu, har skipið hevur heimstað. Tøkugjaldið verður býtt millum kommunurnar eftir lutfallinum av býtinum av partafelagsskatti til kommunurnar frá fyritøkum og samtøkum í alivinnuni fyri annað árið frammanundan.

# Broytt skuldarmark

Skuldarmarkið er ásett í § 43 í kommunustýrislógini og er rættiliga avgerandi fyri fíggjarliga sjálvræðið hjá kommununum. Tað er soleiðis, at um nettoskuldin er omanfyri skuldarmarkið, krevst loyvi frá landsstýrisfólkinum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum.

Á vári 2023 var broyting í kommunustýrislógini samtykt, sum broytti skuldarmarkið hjá kommununum. Frammanundan var skuldarmarkið sett til eina álíkning av kommunuskatti útroknað við einum skattaprosenti á 23. Nú er orðingin broytt soleiðis, at umframt eina álíkning við 23 %, telja eisini eftirlønarskatturin og afturberingin frá landinum við í skuldarmarkinum.

Eftirlønarskatturin og afturberingin eru inntøkur, sum kommunurnar fingu í sambandi við, at tær yvirtóku eldraøkið í 2015. Longu tá vístu kommunurnar á, at hesar inntøkur áttu at verða partur av útrokningini av skuldarmarkinum.

Broytingin hevur við sær, at skuldarmørkini hjá kommununum hækka samanlagt góðar 600 mió. kr. Úr góðum 2,7 mia. kr. upp í góðar 3,3 mia. kr. Í miðal er vøksturin umleið 23 %. Men í teimum kommunum, har nógv gomul búgva, ella har nógv starvast undir serskipanum, er skuldarmarkið hækkað munandi meira, summa staðni upp í 75 %.

Nýggju skuldarmørkini mugu sigast at hóska væl betur til inntøkugrundarlagið hjá kommununum enn gamla skuldarmarkið.

## Hendingar í árinum

# Ikki innlit í mál um setan

Ein stovnsleiðari hevði fingið eina umbøn um innlit í nøkur mál um setan av starvsfólkum á stovninum. Spurningurin var um ella í hvønn mun hendan umbøn skuldi gangast á møti.

Skrivstovan metti, at umbønin kom frá einum uttanfyristandandi, sum ikki var partur í málinum. Reglurnar um skjalainnlit eftir fyrisitingarlógini vóru tí ikki viðkomandi í hesum føri.

Slík umbøn skuldi tískil viðgerast eftir reglunum í innlitslógini. Lógin ásetir í § 2, stk. 1, at mál um setan einans eru fevnd av reglunum um notatskyldu (§ 6). Rættarvirknaðurin av hesari undantaksáseting er, at øll skjøl í málinum í høvuðsheitum eru undantikin frá rættinum til innlit eftir innlitslógini. Víst varð síðani til eitt álit frá Løgtingsins umboðsmanni (21/06912) fyri nærri grundgevingum fyri hesari rættarstøðu.

**Kommunuskattaprosent og barnafrádráttur í 2024**

| Kommuna | Skattaprosent (%) | Barnafrádráttur (kr.) |
|---|---|---|
| Fugloyar kommuna | 16,00 | 10.000 |
| Skúvoyar kommuna | 16,00 | 8.000 |
| Fámjins kommuna | 16,00 | 8.000 |
| Hovs kommuna | 18,00 | 8.000 |
| Kunoyar kommuna | 18,50 | 7.000 |
| Eiðis kommuna | 18,75 | 8.000 |
| Sumbiar kommuna | 19,00 | 7.000 |
| Tórshavnar kommuna | 19,00 | 9.000 |
| Hvannasunds kommuna | 19,75 | 7.000 |
| Eysturkommuna | 19,90 | 9.000 |
| Hvalbiar kommuna | 20,40 | 6.500 |
| Viðareiðis kommuna | 20,50 | 8.500 |
| Nes kommuna | 20,50 | 6.000 |
| Klaksvíkar kommuna | 20,75 | 6.500 |
| Sands kommuna | 20,75 | 8.500 |
| Skopunar kommuna | 20,85 | 6.000 |
| Tvøroyrar kommuna | 20,90 | 8.000 |
| Sunda kommuna | 20,95 | 6.500 |
| Sjóvar kommuna | 21,00 | 7.000 |
| Kvívíkar kommuna | 21,00 | 5.100 |
| Sørvágs kommuna | 21,00 | 7.500 |
| Skálavíkar kommuna | 21,00 | 9.000 |
| Húsavíkar kommuna | 21,00 | 7.000 |
| Porkeris kommuna | 21,00 | 7.500 |
| Vágs kommuna | 21,10 | 6.250 |
| Vestmanna kommuna | 21,15 | 5.500 |
| Fuglafjarðar kommuna | 21,25 | 8.000 |
| Runavíkar kommuna | 21,50 | 9.000 |
| Vága kommuna | 21,50 | 6.500 |
| **Hægsta** | **21,50** | **10.000** |
| **Miðal** | **20,02** | **8.036** |
| **Lægsta** | **16,00** | **5.100** |

**Kommunuskattur í kr. pr. íbúgva í 2023**




**Felagsskattur í kr. pr. íbúgva í 2023**



**Afturbering í kr. pr. íbúgva í 2023**




**Eftirlønarskattur í kr. pr. íbúgva í 2023**





**Inntøkur samanlagt í kr. pr. íbúgva í 2023**






# 11. Kommuna og kommunuhugtakið

Tann kommunala skipanin, ið vit í dag hava í Føroyum, er í stóran mun ávirkað av danskari og norðurlendskari fyrisitingar- og lóggávusiðvenju. Men hugtakið lokalt sjálvræði er elligamalt og byggir á hugsanarhátt úr rómverskum rætti, og snúði seg í høvuðsheitum um, at borgarar í einum býi ella øki høvdu framíhjárættindi sum borgarar í rómverska ríkinum, men vórðu stýrd av egnum lokalum myndugleikum eftir sínum egnu lógum.

Longu seint í miðøldini høvdu kommunur nógvar ymsar uppgávur at røkja, og hetta broyttist nakað undir einaveldinum, men við donsku grundlógini frá 1849 bleiv sjálvstøðugi rætturin hjá kommununum til at røkja egnar uppgávur staðfestur. Tó var staturin eftirlitsmyndugleiki.

Fyrsta føroyska kommunulógin kom í 1872, og nú galdandi kommunustýrislógin er frá ár 2000.

Í Føroyum hava vit nú 29 sjálvstøðugar kommunur, sum í fólkatali eru spjaddar frá Fugloyar og Skúvoyar kommunum við færri enn 50 íbúgvum til Tórshavnar kommunu við fleiri enn 22.000 íbúgvum. Hóast hesa spjaðing í støði, er formliga grundarlagið undir føroysku kommununum stórt sæð eins.

## Kommunur í stýrisskipanarligum høpi

Lokalt sjálvræði er ein týðandi hornasteinur í okkara fólkaræði. Í § 82 í donsku grundlógini er ásett, at “Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov.”

Sambært hesum er greitt, at kommunurnar hava rætt til sjálvstøðugt at stýra egnum viðurskiftum. Kommunurnar hava sjálvstøðugt fíggjarligt frælsi og politiskt sjálvræði. Kommunurnar eru sostatt sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir. Harumframt er breið semja um, at málsførleikin hjá kommununum ikki kann avmarkast á ein tílíkan hátt, at tað ikki longur er talan um veruligt sjálvræði. Umframt rættin til sjálv at útskriva og krevja upp skatt, er kommunalt sjálvræði tongt at teimum uppgávum, ið kommunurnar skulu loysa og tí politiska rásarúmi, sum kommunurnar hava til at leggja til rættis, hvussu kommunalar uppgávur skulu loysast.

§ 82 í grundlógini merkir eisini, at viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og kommunurnar ikki eru yvir- og undirskipað, eins og landsfyrisitingin ikki hevur heimildir at geva kommununum boð, á sama hátt sum annars er galdandi í viðurskiftunum millum landsfyrisitingina og stovnar undir landinum. Bindandi reglur fyri kommunur skulu verða ásettar við heimild í lóg ella aðrari rættarkeldu.

Umframt í grundlógini, er lokalt sjálvræði við tilverurættinum hjá kommununum staðfestur í § 56 í stýrisskipanarlógini, ið er soljóðandi: “Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.”

Sambært fyrireikandi arbeiðinum, orðaljóðinum og viðmerkingunum til § 56, er ásetingin í stýrisskipanarlógini ein beinleiðis endurtøka av tí rætti, sum kommunurnar longu frammanundan hava eftir § 82 í grundlógini.

Umframt staðfestingina í grundlógini og stýrisskipanarlógini um rættin hjá kommunum at skipa egin viðurskifti, er lokala sjálvræðið eisini ein týðandi táttur í evropeisku demokratisku siðvenjuni. Sambært evropeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræði frá 1985, verður lokalt sjálvstýri hugsað sum rætturin og førleikin hjá einum lokalum myndugleika, innan lógarinnar karmar, at stýra og fyrisita einum munandi parti av almennum viðurskiftum, við egnari ábyrgd og við støði í áhuganum hjá fólkinum á staðnum.

Almennar uppgávur skulu í høvuðsheitum røkjast av myndugleikum, sum eru borgaranum næstir. Um annar myndugleiki skal røkja uppgávuna, so eigur hetta at vera grundað á, hvat slag og av hvørjum vavi uppgávan er, og við atliti at virkisføri og fíggjarligum viðurskiftum. Tær heimildir, ið eru lagdar til lokalar myndugleikar, eiga vanliga at verða givnar til fulnar og vera óskerdar. Heimildirnar eiga heldur ikki at verða gjørdar verri ella avmarkast av øðrum almennum myndugleika, uttan so at hetta er heimilað í lóggávuni.

- Europeiski sáttmálin um lokal sjálvræði ásetur nakrar meginreglur, og eru hesar í høvuðsheitum, at almennar uppgávur skulu røkjast av einum myndugleika so tætt at borgaranum sum gjørligt,
- teir lokalu myndugleikarnir skulu hava veruligt sjálvræði yvir teimum uppgávum, ið landafrøðiliga liggja lokalt, og
- at lokalu myndugleikarnir skulu kunna útvega sær fígging til at loysa uppgávuna, her í millum eisini rætt til at útskriva lokalan skatt.

## Kommununalrætturin

Kommunalrættur verður vanliga býttur í tríggjar ymsar tættir, sum er: lóggáva, ið regulerar kommunal viðurskifti, kommunufulltrúin og kommunala eftirlitið.

Lóggáva um kommunal viðurskifti snýr seg í høvuðsheitum um at skipa lóggávu viðvíkjandi økjum, har kommunur hava skyldur og heimildir mótvegis borgarum sínum. Kommunufulltrúin er eitt heimildargrundarlag, sum ikki er regulerað í lóg, men sum kommunurnar kunnu nýta sum heimild at virka á, um ávísar treytir eru loknar. Umframt ta lóggávu, sum beinleiðis regulerar kommunal viðurskifti, eru kommunurnar eisini almennir myndugleikar, og tær eru tí eisini fevndar av fyrisitingarligari lóggávu sum til dømis fyrisitingarlóg, lóg um innlit í fyrisitingina o.t.

Viðurskiftini hjá føroysku kommununum verða stýrd yvirskipað eftir kommunustýrislógini frá 2000. Sambært hesi lóg er kommunustýrið evsti politiski og fyrisitingarligi myndugleiki í kommununi og hevur evsta vald og evstu ábyrgd av kommunalum viðurskiftum.

Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. Kommunala eftirlitið er eitt sokallað legalitetseftirlit, sum merkir, at landsstýrið hevur eftirlit við, at kommunurnar halda galdandi lóggávu. Hinvegin skal eftirlitið ikki taka støðu til, hvørt kommunurnar bera seg skynsamt at, tí hetta hoyrir undir politiska frælsið hjá kommununum at gera av. Kommunala eftirlitið hevur eisini heimild at gera av ivamál um, hvar mørkini fyri heimildum eftir kommunufulltrúini eru.

## Samanumtikið eru eyðkennini fyri lokala sjálvræðið,

- at kommunanna tilverurættur er tryggjaður í grundlóg og stýrisskipanarlóg og byggir á evropeiska demokratiska siðvenju,
- at kommunurnar eru sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir við fíggjarligum og politiskum frælsi,
- at kommunurnar hava frælsi at gera egnar raðfestingar í mun til tær uppgávur, tær skulu røkja,
- at kommunur ikki eru undirskipaðir stovnar undir landinum, og tískil kann landið ikki geva kommununum bindandi boð,
- at kommunur hava rætt til at útskriva egnar skattir og at nýta hesar inntøkur eftir egnum politiskum raðfestingum.

# 12. Um Kommunufelagið

**STÝRIÐ**

*STÝRI FELAGSINS ER MANNAÐ VIÐ BORGARSTJÓRUM SAMSVARANDI § 7 Í VIÐTØKUNUM:*

Tórbjørn Jacobsen, formaður, Runavíkar kommuna
Heðin Mortensen, næstformaður, Tórshavnar kommuna
Bjarni Johansen, Vágs kommuna
Bjarni Prior, Vága kommuna
Bjørg á Rógvi, Vestmanna kommuna
Dávur Juul, Fuglafjarðar kommuna
Eyð Ellingsgaard, Sørvágs kommuna
Heri Sverrason, Sands kommuna
Jóanis Lisberg, Fámjins kommuna
Jógvan Kruse, Sunda kommuna
Karl H. Johansen, Klaksvíkar kommuna
Kristin Michelsen, Tvøroyar kommuna
Per Martin Gregersen, Eysturkommuna

Amalia í Frammistovu, Fugloyar kommuna
Annsy Høghamar, Eiðis kommuna
Artur Johansen, Sjóvar kommuna
Ása Holm, Porkeris kommuna
Delmar Tausen, Hovs kommuna
Eyðbjørn Thomsen, Sumbiar kommuna
Gerhard Lognberg, Skopunar kommuna
Hans Jóhan Sørensen, Kvívíkar kommuna
Janus Thomsen, Hvalbiar kommuna
Jákup Martin Sørensen, Húsavíkar kommuna
Katrin Næs, Hvannasunds kommuna
Linjohn Christiansen, Skálavíkar kommuna
Marita Sumberg, Viðareiðis kommuna
Poul Ásmund Tórarenni, Skúgvoyar kommuna
Poul Jacob Poulsen, Kunoyar kommuna
Suni í Hjøllum, Nes kommuna

**STARVSFÓLKABÓLKURIN**

*Í STARVSBÓLKINUM ERU UMSITINGARLEIÐARARNIR SAMBÆRT § 8 Í VIÐTØKUNUM:*

Jóan Petur Hentze, Tórshavnar kommuna
Arni Teindal, Fámjins kommuna
Dinna Jensen, Runavíkar kommuna
Erik Lervig, Eysturkommuna
Erland Berg Danielsen, Sunda kommuna
Fróði Mortensen, Tvøroyrar kommuna
Jóanis Erik Køtlum, Fuglafjarðar kommuna
Jóhan Henrik Ellefsen, Vága kommuna
Marner Højsted, Sands kommuna
Petry Harginsdóttir Mortensen, Vágs kommuna
Rúna Ingunardóttir, Vestmanna kommuna
Rúni Rasmussen, Klaksvíkar kommuna
Sunrid Rasmussen, Sørvágs kommuna
Amy Bech, Sumbiar kommuna
Anna E. Joensen, Sjóvar kommuna

Beinta Lind Sørensen, Hvannasunds kommuna
Eilin Hovgaard, Porkeris kommuna
Elsebeth E. Magnussen, Nes kommuna
Eyðvør Dam, Húsavíkar kommuna
Guðrun Ejdesgaard, Eiðis kommuna
Heidi Hammer, Hovs kommuna
Irdi Mittelstein, Skopunar/Skálavíkar kommuna
Jóhanna B. Djurhuus, Hvalbiar kommuna
Johild Smith Joensen, Skúgvoyar kommuna
Rannvá Isaksen, Kvívíkar kommuna
Rebecca R, Petersen, Kunoyar kommuna
Símun Gullaksen, Fugloyar kommuna
Tanja Jacobsen, Viðareiðis kommuna

**NEVNDIN Í KAF**

Per Martin Gregersen, formaður, Eysturkommuna
Jógvan Kruse, næstformaður Sunda kommuna
Dávur Juul, Fuglafjarðar kommuna
Bjarni Johansen, Vágs kommuna
Bogi Bendtsen, SEV
Jóhannus Danielsen, IRF

**SKRIVSTOVAN**

Kommunufelagið
R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn
Telefon 30 24 80
www.kf.fo
kf@kf.fo

**KOMMUNUFELAGIÐ · KF.FO**

Eyðun Christiansen, stjóri · eydunc@kf.fo · 28 24 80
Janus Haraldsen, løgfrøðingur · janush@kf.fo · 22 54 80
Hans Kári Vang, búskaparfrøðingur · hanskariv@kf.fo · 78 70 05
Armgarð Hammer, skrivari · armgard@kf.fo · 28 24 81
Sigrid J. Dalsgaard, verkætlanarleiðari · sigridjd@kf.fo · 27 01 15
Martin Johannessen · skrivstovufólk · martin@kf.fo



**KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ · KAF.FO**

Anita Fuglø, leiðari · anita@kaf.fo · 22 63 39
Bina Reginsdóttir, fulltrúi, binar@kaf.fo · 22 98 66
Bjarni Mortensen, fulltrúi · bjarnim@kaf.fo · 28 03 39

**BARNAVERNDARSTOVAN · BVS.FO**

Oddbjørg Balle, leiðari · ob@bvs.fo · 22 56 96
Anna Dam, løgfrøðiligur ráðgevi · annadam@bvs.fo · 51 90 82
Brynhild Høgnadóttir, samskifti og verkætlanir · brynhildh@bvs.fo · 26 06 80
Anna Maria Troest, sosialráðgevi · annat@bvs.fo · 21 44 81

**SSP-RÁÐGEVINGIN · SSP.FO**

Súsanna í Króki, SSP-ráðgevi · sik@ssp.fo · 22 26 93 (farloyvi)
Daisy J. Iversen, SSP-ráðgevi · di@ssp.fo · 22 26 94
Jákup av Skarði, SSP-ráðgevi · javs@ssp.fo · 22 26 93

**LISTALEYPURIN · LISTALEYPURIN.FO**

Rannvá Káradóttir Justinussen, verkætlanarfólk · listaleypurin@listaleypurin.fo · 21 01 25

Hendingar í árinum

## Ansingarsamsýning bert frá tí degi avgerð er tikin

Eitt eldrasamstarv fekk umsókn um at veita ansingarsamsýning. Samstarvið viðgjørdi málið, og tók stutt eftir avgerð um at játta umsóknini. Avgerð varð í hesum sambandi tikin um at játta samsýning frá tí degi, avgerðin varð tikin. Hetta var í tráð við áseting í viðkomandi kunngerð (nr. 127 frá 17.12.2014).

Umsøkjarin metti seg hava krav upp á ansingarsamsýning frá tí degi, umsóknin varð send inn.

Skrivstovan metti, at her var talan um eina ógvuliga greiða kunngerðaráseting, og at hendan áseting ikki kundi metast at vera í stríð við undirliggjandi lógarverkið. Heimild var ikki fyri at víkja frá hesi áseting.

Mælt var til at kunna umsøkjaran um hetta og vegleiða um kærumøguleikar.

Málið varð síðani kært til Føroya Kærustovn, sum gjørdi av at heimvísa kæruna til nýggja viðgerð. Heimvísingin varð grundað á, at eldrasamstarvið ikki hevði tikið støðu til uppáhaldið í klaguni um, at klagarin ikki fekk vegleiðing um møguleikan at fáa ansingarsamsýning. Kærustovnurin metti, at varð vegleiðingarskyldan ikki hildin, so kundi hetta tala fyri, at undantak kundi gevast frá útgangsstøðinum um at lata ansingarsamsýning frá avgerðardegnum. Samstarvið tók við støði í hesum nýggja avgerð, sum eftir viðgerð av spurninginum um vegleiðingarskylduna fekk sama innihald.

# Viðtøkur fyri Kommunufelagið

*VIÐTØKUR FYRI KOMMUNUFELAGIÐ SAMTYKTAR Á STOVNANDI AÐALFUNDI 13. DESEMBER 2013 OG BROYTTAR Á EYKAAÐALFUNDI HIN 15. DESEMBER 2023.*

## NAVN, LIMASKAPUR OG HEIMSTAÐUR

**§ 1.** Navn felagsins er Kommunufelagið, og hevur felagið heimstað í Tórshavn

**§ 2.** Allar kommunur í Føroyum kunnu gerast limir.

**§ 3.** Upptøka av nýggjum limum verður góðkend á aðalfundi.

## ENDAMÁL

**§ 4.** Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum, størri kommunalum sjálvræði, og betri samstarvi millum kom
munurnar.

## AÐALFUNDURIN

**§ 5.** Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
*Stk. 2.* Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta.
*Stk. 3.* Boðast skal til aðalfund við í minsta lagi 30 daga freist. Fundarskrá verður kunngjørd limakommununum í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 4.* Limir, ið vilja hava mál til viðgerðar á aðalfundinum, senda felagnum hesi í minsta lagi 21 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 5.* Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at eingin kommuna hevur fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 6.* Er ikki annað tilskilað í hesum viðtøkum, verða avgerðir á aðalfundi tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 7.* Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av limunum eru møttir.

**§ 6.** Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum árið í seinasta lagi 30. apríl við hesi skrá:

- Val av fundarstjóra.
- Formaðurin letur frágreiðing um virksemi felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
- Framløga av roknskapi til góðkenningar.
- Val av grannskoðara.
- Innkomin uppskot.
- Ymiskt.

*Stk. 2.* Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið minst helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund.

## STÝRIÐ

**§ 7.** Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.
*Stk. 2.* Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval, og verður stýrið valt eftir hesi skipan:

- Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) 1 lim.
- Eystur Eysturoy (Fuglafjørður, Eystur k.) 2 limir.
- Vestur Eysturoy (Nes, Runavík, Sjóvar k.) 1 lim.
- Sundalagið (Sunda k. og Eiði) 1 lim.
- Streymoy (Tórshavn) 1 lim.
- Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík) 1 lim.
- Vágar (Sørvágur, Vága k.) 1 lim.
- Sandoy (Sandur, Skopun, Skálavík, Húsavíkar k. og Skúvoy) 1 lim.
- Norður Suðuroy (Hvalba, Tvøroyri og Fámjin) 1 lim.
- Suður Suðuroy (Hov, Porkeri, Vágur og Sumba) 1lim.

Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.
*Stk. 3.* Kommunurnar sum sambært stk. 2 ikki fáa lim í stýrið, velja 2 umboð eftir hesum leisti.

- Kommunurnar við fleiri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð
- Kommunurnar við færri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð

*Stk. 4.* Tá ið valt verður sambært stk. 3, hevur hvør kommuna eina atkvøðu. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2 í kommunustýrislógini.
*Stk. 5.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.
*Stk. 6.* Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá ið minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Hvør stýrislimir hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar í teimum kommununum, sum stýrislimurin umboðar. Tó so, eingin stýrislimir kann hava fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 7.* Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.
*Stk. 8.* Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund. Stýrið kann eisini verða kallað saman, tá ið minst helmingurin av stýrislimunum skrivliga biðja um tað
*Stk. 9.* Fráboðan um stýrisfund verður send stýrislimum 14 dagar áðrenn fund.

## STARVSBÓLKURIN

**§ 8.** Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í teimum kommunum, sum hava umboð í stýrinum. Stýrið velur starvsbólkaformann fyri tvey ár í senn.
*Stk. 2.* Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.
*Stk. 3.* Starvsbólkurin hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin.
*Stk. 4.* Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.
*Stk. 5.* Allir starvsbólkalimir skulu møta á stýrisfundum.
*Stk. 6.* Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

## SKRIVSTOVAN

**§ 9.** Stýrið setur og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum, fyri at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.
*Stk. 2.* Stjórin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.
*Stk. 3.* Stýrið ger starvsskipan fyri stjóran.
*Stk. 4.* Stjórin setur og loysir úr starvi onnur starvsfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum stjóran og limakommunurnar.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI

**§ 10.** Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Limagjaldið verður ásett samsvarandi íbúgvaratalinum í kommununum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.
*Stk. 2.* Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og stjóranum uppskot til fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi.
*Stk. 3.* Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 4.* Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part av limagjaldinum hvønn mánað til felagið.
*Stk. 5.* Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

*Stk. 6.* Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

## ROKNSKAPUR

**§ 11.** Stjórin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

## AÐRAR ÁSETINGAR

**§ 12.** Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella stjóranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella stjóranum.

**§ 13.** Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2.* Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

**§ 14.** Við minst 6 mánaða ávaring kann ein kommuna siga upp limaskap sín í felagnum til ein 1. januar.
*Stk. 2.* Kommunur, ið melda seg úr felagnum, hava einki krav móti felagnum ella ognum felagsins, og hefta ikki fyri skyldur felagsins.

**§ 15.** Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins seinasta roknskaparárið.

## SKIFTISÁSETINGAR

**§ 16.** Felagið tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá KSF og FKF.

**§ 17.** Í samband við fyrsta valskeiðið, sum verður trý ár, tekur stýrið sjálvt avgerð um val av formanni og næstformanni sambært § 7, stk. 5, og viðvíkjandi val av starvsbólkaformanni sambært § 8, stk. 1.

**§ 18.** Limagjald fyri fyrsta roknskaparárið verður samtykt á stovnandi aðalfundi.

## GILDISKOMA

**§ 19.** Viðtøkur felagsins fáa gildi frá 1. januar 2014.



Hendingar í árinum

# Barnaváttanir skulu altíð innheintast

Ein kommuna vendi sær til skrivstovuna við einum ivamáli um, hvussu lógin um barnaváttanir skuldi skiljast. Støðan hjá kommununi var tann, at hon lutfalsliga javnan var í einari støðu, har tað var neyðugt at fáa fólk inn á dagstovnaøkið við stuttum varningi – t.d. í sambandi við sjúku hjá føstum starvsfólki. Kommunan vildi tí vita, um hesi viðurskifti kundu koma undir nakað av serligu undantøkunum í lógini.

Skrivstovan vísti á, at undantøkini ikki kundu brúkast í hesum føri, tí tey fevna ikki um kommunur ella aðrar vanligar arbeiðsgevarar. Tískil metti skrivstovan, at tað ikki hevði verið í samsvari við barnaváttanarlógina at lata fólk byrja í starvi, sum krevur barnaváttan, fyrr enn nøktandi váttan fyriliggur.

Skrivstovan vísti eisini á, at Kommunufelagið yvirfyri avvarðandi aðalráði hevur víst á óhepnu avleiðingarnar av lógini – herundir, at kommunur kunnu koma í eina støðu, har tær mugu velja ímillum at halda barnaváttanarlógina ella at steingja stovur/stovnar. Felagið hevur eisini skotið upp ítøkiligar loysnir, men landsstýrið hevur ikki svarað felagnum.

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1 Navn og limaskapur**
*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.
*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF
*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF
*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn

**§ 2 Endamál felagsins**
*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:
- samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt
- røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.
- virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir
- gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið
- virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst
- við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3 Upptøka**
*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.
*Stk. 2.* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4 Útmeldan**
*Stk. 1.* Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.
*Stk. 2.* Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.
*Stk. 3.* Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5 Ársfundur**
*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.
*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.
*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.
*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.
*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør.
Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 6.* Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.
*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra
b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi
d) Innkomin mál.
e) Ymiskt

**§ 6 Nevndin**
*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.
*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.
*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.
*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.
*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.
*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.
*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.
*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**
*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.
*Stk. 2.* Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.
*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.
*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

**§ 8 Limagjald**
*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.
*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.
*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.
*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**
*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**
*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.
Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.
*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.
*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**
*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.
*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**
*Stk. 1.* Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.
*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**
*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.
*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**
*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.
*Stk. 2.* Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.
*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**
*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.
*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**
*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014

## Hendingar í árinum

# Burturbeining av atkvøðutilfari

Í sambandi við eina gjøgnumgongd av skjalatilfarinum hjá kommununi stak spurningurin seg upp, um kommunan kundi beina atkvøðutilfar frá farnum kommunuvalum burtur.

Skrivstovan vísti á, at heimild/skylda er í kommunuvallógini at beina atkvøðutilfar burtur, tá ið kærufreistin er av (ella kæran er liðugt viðgjørd). Eftir at hava ráðført seg við Søvn Landsins vísti skrivstovan á, at valprotokollir og yvirlit ikki mugu verða burturbeind, men altíð skulu verða latin landinum til varðveitslu. Mælt varð eisini til at goyma eitt lítið úrval av atkvøðutilfari frá hvørjum vali til møgulig lokalsøgulig endamál, so sum framsýningar ella sum savnstilfar.

# Viðtøkur fyri Barna-verndarstovu Føroya

**§ 1.** Barnaverndarstova Føroya er felagskommunalur stovnur, sum kommunurnar eiga.

**ENDAMÁL STOVNSINS**

**§ 2.** Barnaverndarstovan skal arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkini úti um landið og seta á stovn og reka fosturforeldraskipan sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum.

**POLITISK LEIÐSLA**

**§ 3.** Ovasta politiska leiðsla stovnsins er stýrið í Kommunufelagnum.

**FYRISITING**

**§ 4.** Stjórin fyri KF setir leiðara at hava dagligu fyrisitingarligu og fakligu leiðsluna av Barnaverndarstovuni.
*Stk. 2.* Stjórin fyri KF letur gera starvsskipan fyri leiðaran.
*Stk. 3.* Stjórin í KF setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á Barnaverndarstovuni
*Stk. 4.* Leiðarin fyri Barnaverndarstovuna vísir fyrisitingarliga til stjóran fyri Kommunufelagið.

**FÍGGING**

*§ 5.* Kommunufelagið rindar allar útreiðslur fyri Barnaverndarstovuna
*Stk. 2.* leiðarin ger saman við stjóranum innan 1. juli eina fíggjarætlan sum verður partur av samlaðu fíggjarætlanin hjá KF.

**GRANNSKOÐAN**

**§ 6.** Roknskapurin verður grannskoðaður, sum ein partur í roknskapinum hjá KF.

**GILDISKOMA**

**§ 7.** Hesar viðtøkur koma í gildi 1. januar 2014.

**SKIFTISÁSETING**

**§ 8.** Verandi nevnd fyri Barnaverndarstovuna – formenninir í KSF og FKF, áðrenn Kommunufelagið varð stovnað – halda áfram hetta valskeiðið til 1. januar 2017, men leggja øll mál av týdningi fyri stýrið í KF.

Tórshavn 17.01.2014

Hendingar í árinum

## Umsókn um byggiloyvi í øki uttan leiðingar

Ein kommuna hevði fingið umsókn um bygging í einum øki, sum vatn- og kloakkleiðingar ikki vóru lagdar til. Byggingin, sum søkt varð um, helt seg innanfyri ásetingarnar fyri økið. Spurningurin var tí ikki, um byggingin skuldi loyvast, men hvørt eitt byggiloyvi fór at áleggja kommununi eina skyldu at gera hesa leiðingar. Ítøkiliga vildi kommunan vita, um nøkur lógarásett skylda var fyri kommununa, ella um umsøkjarin kundi áleggjast at bera kostnaðin av veitingunum.

Skrivstovan var ikki kunnug um slíkar lógarásetingar. Metingin var tí, at ein umsókn um byggiloyvi ikki álegði kommununi eina skyldu at gera íløgur í nýggjar leiðingar. Mett varð eisini, at eftir avtalu við umsøkjara var neyvan nakað til hindurs fyri til dømis at loyva umsøkjaranum at gera arbeiðið fyri egna rokning, um undirtøka var fyri hesum í kommunustýrinum. Dentur varð tó lagdur á, at kommunan í tí føri átti at leita sær holla løgfrøðiliga ráðgeving um, hvussu avtalan við umsøkjaran skal gerast, soleiðis at kommunan tryggjar síni (sakligu) áhugamál – serliga viðvíkjandi hóskandi projektering og framtíðar ognar-/ræðisrætti.

Vildi kommunan generelt skipa viðurskiftini viðvíkjandi gjøldum í sambandi við byggimálsviðgerð, viðmælti skrivstovan at gera hetta við støði í reglunum í bygningskunngerðini (§ 2). Víst varð eisini á, at reglur um gjøld harumframt lógliga kunnu ásetast í byggisamtykt. Báðir hættir krevja góðkenning frá landsstýrisfólkinum.

Hendingar í árinum

## Kann kommunustýrislimur krevja mál úr nevnd?

Ein kommunal nevnd hevði í fleiri umførum viðgjørt eitt ítøkiligt mál. Málið var sum skilst torgreitt, og hetta bar í sær, at tørvur støðugt var á nærri upplýsingum, áðrenn nevndin kundi taka støðu. Soleiðis var eisini á seinasta fundinum, har nevndin gjørdi av at útseta málið.

Ein limur í nevndini ynski málið avgreitt, og vildi tí hava málið úr nevndini og sett á skrá til fyrstkomandi kommunustýrisfund. Spurningurin var, um kommunustýrislimurin kundi krevja hetta.

Skrivstovan vísti á, at spurningurin her var, um kommunustýrislimurin kundi nýta sonevnda íhaldsrættin í § 32 í kommunustýrislógini. Víst varð á, at íhaldsrætturin grundleggjandi er ein minnilutaverja ímóti at seta avgerðir í verk uttan um kommunustýrið. Rætturin gevur einum kommunustýrislimi (sum var til staðar á nevndarfundinum) møguleika at krevja eina avgerð hjá nevndini lagda fyri kommunustýrið til endaliga støðutakan, áðrenn avgerðin verður sett í verk. Í hesum liggur, at talan bæði skal vera um 1) eina avgerð, sum nevndin hevur fingið heimild at taka endaliga og 2) eina avgerð, sum í roynd og veru verður tikin á fundinum.

Sum málið varð lýst, var í øllum førum onnur treytin ikki lokin – nevndin tók onga avgerð. Harvið var ongin íhaldsrættur hjá kommunustýrisliminum at brúka, tí ongin avgerð kundi setast í verk.

Víst var tó á, at kommunustýrislimurin framvegis kundi nýta sonevnda framtaksrættin í § 15. Rætturin gevur kommunustýrisliminum rætt til at fáa eitt og hvørt mál á skrá – uttan mun til hvar tað liggur, tað vil siga eisini nevndarmál, sum eru undir nevndarviðgerð.

Í hesum sambandi er tó umráðandi at hava í huga, at framtaksrætturin ikki fevnir um ta framhaldandi avgreiðsluna av málinum. Hetta skal skiljast soleiðis, at framtaksrætturin ikki kann nýtast til at fara rundan um vanligu mannagongdirnar fyri eitt mál, til dømis um málið skal hava endaliga nevndarviðgerð, áðrenn kommunustýrið kann taka støðu til málið. Í slíkum førum kann kommunustýrislimurin bert krevja, at málið kemur á skrá til umrøðu.